Búskaparráðið

# FØROYSKI BÚSKAPURIN

## Várið 2025

Konjunkturfrágreiðing

**Report from the Economic Council of the Faroe Islands**
**Spring 2025**

**Búskaparráðið**

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og veita óhefta búskaparliga ráðgeving og gera frágreiðingar um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílu á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya: https://www.landsbankin.fo/fo-fo/buskaparraðið/fragreiðingar

**Limir Búskaparráðsins eru:**
Johnny í Grótinum, formaður, cand.polit
Anja Rein, Diplomútbúgving innan banka og MSc í leiðslu
Hans Ellefsen, PhD. í búskaparfrøði
Jan Otto S. Holm, cand.merc.fir
Marjun Weihe Thomassen, cand.merc.aef

**Skrivarar Búskaparráðsins:**
Landsbanki Føroya, samstarv er við Hagstovu Føroya.

ISBN: 978-99918-3-854-0

# Innihaldsyvirlit

**Samandráttur** .................................................................... 4

**Konjunkturfrágreiðing – várið 2025** .............................................. 7

**Búskaparligar ábendingar** ....................................................... 8

- **Meting av vøkstrinum í BTÚ** ................................................ 8
- **Starvsfólk, lønargjaldingar og arbeiðsloysi** ................................ 10
- **Inflatión** ............................................................... 13
- **Altjóða útlit** ........................................................... 15

**Húsarhaldini** .................................................................... 17

**Vinnan** .......................................................................... 23

**Uttanlandshandil** ................................................................ 27

**Almenna fíggjarstøðan og útlit** .................................................. 31

**Arbeiðsmarknaðurin** .............................................................. 40

- **Gongdin í vinnuni** ....................................................... 45
- **Gongdin í almennari fyrisiting og tænastu** ................................ 47
- **Arbeiðsmarknaðardemografi** ............................................... 48

**English summary: Economic Growth Slows Down** ..................................... 53

**Keldur** .......................................................................... 57

**Notur** ........................................................................... 58

# Samandráttur

## Búskapurin veksur ikki við somu ferð

Búskaparráðið hevur í samstarvi við Hagstovu Føroya mett um vøksturin í BTÚ fyri árini 2024 – 2026. Metingarnar av BTÚ verða gjørdar í ársins prísum. Vøksturin í BTÚ er mettur at vera ávikavist 3,0% í 2024, 5,0% 2025 og 5,7% í 2026, sí talvuna niðanfyri.

| | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ í ársins prísum (mia.kr) | 25,2 | 26,9 | *27,7* | *29,1* | *30,8* |
| Árligur vøkstur í ársins prísum (%) | 9,5 | 6,7 | *3,0* | *5,0* | *5,7* |
| Árligur realvøkstur (%) | 3,6 | 2,5 | | | |
| Inflatión (%) | 7,7 | 4,7 | 2,0 | | |

Viðm.: BTÙ í 2022 og 2023 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2024, 2025 og 2026 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Hagstova Føroya hevur uppgjørt BTÚ til og við 2023. Í 2022 var vøksturin í ársins prísum 9,5% meðan realvøksurin var 3,6%, og í 2023 var vøksturin í ársins prísum og realt ávikavist 6,7% og 2,5%. Talvan vísir samstundis at inflatiónin er lækkað í 2024 og togar tískil ikki vøksturin í BTÚ upp á sama hátt sum í 2022 og 2023.

### Bjartskygnið er lækkað

Starvsfólkatalið og lønargjaldingarnar settu met í 2024, og arbeiðsloysið var einans 1% í januar 2025. Tað merkir, at arbeiði er til allar hendur, og tað stuðlar undir privatu nýtsluna. Sambært seinastu brúkarakanningini hjá Hagstovu Føroya eru tað eitt sindur fleiri húsarhald, enn í kanningini frá í summar, sum júst fáa endarnar at røkka saman. Prísirnir veksa tó ikki longur við somu ferð, og fólk hava fingið lønarhækkan, skattalætta og rentulækkingar, ið kann økja um bjartskygnið hjá húsarhaldunum. Ein ótryggari heimur kann hinvegin gera fólk meira varin. Eitt møguligt tekin um, at húsarhaldini eru vorðin meira varin, er til dømis at sølan av bilum er lækkað, og at sølan av drúgvum húsarhaldsvørum stendur í stað.

Arbeiðsloysið hevur verið lágt í Føroyum í longri tíð, og tað kann hava ta avleiðing, at framleiðslan í landinum verður minni, enn hvat hon kundi verið, um trot ikki var á arbeiðsmegi. Skipanirnar við at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya hava tó minkað um arbeiðstrotið í ávísum vinnugreinum og harvið eisini tálmað trýstið á lønarvøkstrinum. Serliga síðani fast-track skipanin fyri triðjalond kom í november 2021 hevur tilgongdin av útlendskari arbeiðsmegi verið stór. Vøksturin av útlendskari arbeiðsmegi var á sínum hægsta stigi í 2022, og er minkaður síðani, og líkt er tískil til, at stóra tilgongdin av útlenskum starvsfólkum er hæsað av.

Ávísin (indikatorurin) hjá byggivinnuni er triðja hálvárið á rað fallin og er í seinastu kanningini farin niðurum miðal. Byggivinnan boðar frá færri bíleggingum og harumframt væntar byggivinnan, at arbeiðstørvurin verður minni komandi árið. Ráðgevarafyritøkurnar

hava sambært Ráðgevarafelagnum minni at gera, ið kann vera eina ábending um, at færri verkætlanir vera til byggivinnuna komandi tíðina. Handilsvinnan er hinvegin meira bjartskygd. Ávísin hjá handilsvinnuni er í seinastu kanning av konjunkturbarometrinum hjá Hagstovuni øktur nógv síðani á sumri 2024; millum annað er ávísin fyri væntaða sølu kvinkaður upp. Tænastuvinnan er somuleiðis bjartskygd; gongdin í tænastuvinnuni hevur verið betri í seinastuni, og samlaði eftirspurningurin er vaksin.

Samlaði útflutningurin minkaði í 2024, men innflutningurin fall uppaftur meira, og tí vaks avlopið á handilsjavnanum í 2024. Samanumtikið eru útlitini hjá útflutningsvinnunum góð. Hjá tilfeingisvinnunum eru bíleggingarnar fleiri og vinnan er meira bjartskygd um framleiðsluna komandi árið, enn í seinastu kanning. Orsøkin til, at væntaða framleiðslan hjá tilfeingisvinnunum økist, stavar helst frá, at alivinnan veksur munandi um framleiðsluna í ár og komandi ár. Framleiðslan hjá fiskivinnuni verður hinvegin væntandi minni komandi árið vegna minkandi kvotur; eitt nú minkar toskakvotan í Barentshavinum, og kvotan av norðhavssild fer niður í eina helvt.

Umleið helmingurin av føroyska vøruútflutninginum fór til ES í 2024 og ein tíggjundapartur til USA. Altjóða fíggjarmarknaðirnir hava verið órógvaðir av, at amerikanski forsetin hevur hótt við at leggja eyka toll á vørur innfluttar úr millum annað ES. Slakast búskaparvøksturin í Evropa orsakað av amerikanska tollinum, kann keypiorkan hjá brúkarunum á okkara útflutningsmarknaðum í Evropa minka, og tað kann ávirka eftirspurningin eftir okkara fiskavørum neiliga. Tollur á vørur úr Evropa kann harumframt fyri Føroyar merkja, at tollur eisini verður lagdur á føroyskar vørur, ið rakar serliga laksaútflutningin til USA.

### Almenna nýtslan veksur støðugt

Í 2024 var almenna nýtslan størri enn í 2023 m.a. av lønarhækkingum og lønarlyfti til ymiskar fakbólkar, og harumframt vaks almenni starvsfólkahópurin í 2024 samanborið við 2023. Afturat hesum veksa almennu útreiðslurnar til fólkapensjónir vegna størri tal av pensjónistum. Lønargjaldingarnar veksa somuleiðis hjá kommununum hesi bæði árini. Almennu íløgurnar minkaðu hinvegin í 2024 samanborið við 2023, og úrslitið á fíggjarlógini er mett at verða undirskot á 300 mió. kr. í 2025 og 265 mió. kr. í 2026. Hetta svarar til áleið 1% av BTÚ ár undan ár, sum als ikki eigur at koma fyri í einum samfelagi uttan nakað nevnivert arbeiðsloysi. At hall er á fíggjarlógini merkir, at skuldin hjá landinum kemur at veksa komandi árini. Tað ber við sær hægri rentuútreiðslur, sum merkir, at ein størri partur av skattainntøkunum, skulu brúkast til at rinda rentur við.

Í januar 2024 útgav Búskaparráðið eina greining av fíggjarpolitiska haldførinum, sum vísti, at orsakað av demografisku broytingunum, fara útreiðslurnar í framtíðini at renna frá inntøkunum, um ikki bygnaðarligar broytingar verða gjørdar. Tí er umráðandi at fáa tamarhald á útreiðslunum. Búskaparráðið mælir framvegis til at seta eitt fíggjarpolitisk regluverk í verk, soleiðis at politiska skipanin áhaldandi stýrir eftir greiðum fíggjarpolitiskum málum fyri komandi 5 til 10 árini. Eisini er neyðugt at hyggja at inntøkunum og gera tiltøk fyri at økja um tær. Tað er neyðugt, at politisku myndugleikarnar

skipa samfelagið soleiðis, at tað í longdini er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá tí almenna, annars fer almenna skuldin at veksa uttan íhald.

### Fleiri nýskipanir mugu setast í verk fyri at fáa fíggjarpolitikkin haldføran

Landsstýrið hevur havt eitt uppskot til hoyringar um at hækka pensjónsaldurin upp í 70 ár frá 2035 til 2042. Um uppskotið verður samtykt, bøtir tað um fíggjarpolitiska haldførið. Á fleiri økjum ber til at umskipa raksturin soleiðis at hann verður meira effektivur. Í Føroyum eru nógvir smáir stovnar, bæði á fólkaskúlaøkinum, í almannaverkinum og á eldraøkinum. Smáir stovnar gera tað væl truplari at hava skynsaman rakstur á stovnunum og harafturat krevja smáir stovnar eitt hægri starvsfólkatal fyri hvønn brúkara samanborið við um stovnarnir vóru størri. Hetta er serliga galdandi, tá ið stovnarnir hava tørv á samdøgursmanning.

Eldra- og dagstovnaøkið, sum eru stór og krevjandi økir, liggja hjá kommununum. Kommunurnar eru sera ymiskar, bæði í støðd, í aldursamanseting av íbúgvunum og í inntøkugrundarlagi. Neyðugt er hjá politiska myndugleikanum at endurskoða skipanina millum land og kommunur, tí allar kommunur koma ikki at megna hesa avbjóðing. Skilagott hevði verið at lækka talið á kommunum, so umsitingarliga orka er til at taka sær bæði av dagstovna- og eldraøkinum. Annar møguleiki at endurskoða, um dagstovnaøkið og/ella eldraøkið eigur at liggja hjá kommunum. Neyðugt er undir øllum umstøðum at endurskoða fíggingina hjá kommununum.

Ítøkiliga átti landsstýrið eisini at sett eina nevnd at koma við nágreiniligum rationaliseringsætlanum innan øll trý stóru vælferðarøkini: almannaverkið, heilsuverkið og skúlaverkið. Eindarkostnaðirnir mugu lækkast, annars fara samlaðu almennu útreiðslurnar bara at veksa uttan íhald næstu mongu árini. Tí er tørvur á umfatandi nýskipanum á øllum vælferðarøkinum.

### Íløgurnar mugu raðfestast

Almenna bruttoskuldin (EGS skuldin) er mett at vera 30% við ársenda 2025, ið svarar til 8,8 mia. kr. Tilmælda hámarkið fyri EGS skuld er 60%. Um skuldin var 60% av BTÚ, svarar tað til eina skuld á 17,4 mia.

Neyðugt og umráðandi er at raðfesta íløgurnar. Er endamálið við íløgunum at betra um fíggjarpolitiska haldførið, noyðast tær íløgurnar, sum fara at lætta um almennu rakstrarbyrðuna í longdini, at hava hægstu raðfesting. Hetta kann eitt nú gerast við at byggja størri eindir á skúla-, almenna og eldraøkinum. Fyri at tryggja eina burðadygga samfelagsmenning má javnvág vera millum nútíð og framtíð, har íløgur gagna komandi ættarliðum uttan at skapa eina ovurstóra fíggjarliga byrðu. Tí er neyðugt at raðfesta rætt millum samfelagsligar tænastur sum búspláss á ellisheimum, undirstøðukervi, útbúgvingarskipan, KT-verkætlanum og annað. Føroyar eiga at fáa sum mest fyri hvørja krónu og tí eiga kost-nyttu greiningar at verða gjørdar av stórum verkætlanum, soleiðis at verkætlanir, sum geva størst samfelagnyttu verða raðfestar fyrst.

# Konjunkturfrágreiðing – várið 2025

01

# Búskaparligar ábendingar

## Meting av vøkstrinum í BTÚ

Búskaparráðið hevur í samstarvi við Hagstovu Føroya mett um vøksturin í BTÚ fyri árini 2024 – 2026. Metingarnar av BTÚ verða gjørdar í ársins prísum. Vøksturin í BTÚ er mettur til at verða ávikavist 3,0% í 2024, 5,0% 2025 og 5,7% í 2026.

**Talva 1.1: BTÚ og BTÚ vøkstur í leypandi prísum**

| | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ í ársins prísum (mia. kr) | 25,2 | 26,9 | 27,7 | 29,1 | 30,8 |
| Árligur vøkstur í ársins prísum (%) | 9,5 | 6,7 | 3,0 | 5,0 | 5,7 |

Viðm.: 2022 og 2023 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2024, 2025 og 2026 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið

BTÚ fyri 2022 og 2023 eru uppgjørd tøl. BTÚ var í 2023 26,9 mia. kr. og er mett at verða 27,7 mia. kr. í 2024, 29,1 mia. kr. í 2025 og 30,8 mia. kr. í 2026. Stóri vøksturin, sum var í 2022 og 2023 sæst ikki aftur í 2024, men veksur spakuliga aftur í 2025 og uppaftur meira í 2026, sí talvu 1.1.

Á mynd 1.1 sæst at vøksturin í 2022 varð 9,5% í ársins prísum, meðan realvøkursturin var 3,6%. Í 2023 var vøksturin í ávikavist ársins prísum og føstum prísum 6,7% og 2,5%. Í 2022 og 2023 var høga inflatiónin við til at toga BTÚ í ársins prísum upp.

**Mynd 1.1: BTÚ vøkstur: í árligum prísum og árligum realvøkstri**




Viðm.: 2022 og 2023 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2024, 2025 og 2026 eru metingar hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Orsøkirnar til mettu broyttu gongdina í búskapinum eru fleiri og skula finnast í pørtunum í veitingarjavnanum, tí broytingar í framleiðslu, útflutningi, innflutningi og nýtslu hava stóra ávirkan á búskapin. Nakrir konjunkturávísar hava ein lyklaleiklut fyri at meta um búskapargongdina. Konjunkturávísarnir eru saman við einum búskaparmyndli grundarlagið handan metingarnar.

Lønargjaldingar settu met í 2024 og tað saman við einum høgum starvsfólktali og sera lágum arbeiðsloysi ger, at privata nýtslan dregur búskaparvøksturin upp. Høga inflatiónin og rentuhækkingarnar undanfarin ár hava havt ávirkan á keypiorkuna hjá fólki. Sambært seinastu brúkarakanningini hjá Hagstovu Føroya eru eitt sindur fleiri, ið júst fáa endarnar at røkka saman. Hinvegin vaksa prísirnir ikki longur við somu ferð, og fólk hava fingið lønarhækkan og skattalætta, samstundis sum rentan er sett niður við um 1% síðsta árið. Hetta kann gera at privata nýtslan økist. Ein ótryggari heimur kann eisini ávirka brúksmynstrið húsarhaldunum, og gera tey meira varin. Eitt tekin um, at húsarhaldini møguliga eru vorðin meira varin er til dømis at innlánsvøksturin er øktur. Sølan av nýggjum og brúktum bilum er lækkað og sølan av drúgvum húsarhaldsvørum stendur í stað. Hetta eru nakrir konjunkturávísar, sum siga nakað um, um fólk fegin brúka pengar ella halda seg aftur og heldur spara saman.

Almenna nýtslan veksur støðugt. Í 2024 var almenna nýtslan størri enn í 2023, millum annað vegna lønarlyfti og lønarhækkingum til ymiskar fakbólkar umframt at almenni starvsfólkahópurin vaks í 2024 samanborið við 2023. Harafturat veksa almennu útreiðslurnar til fólkapensjónir vegna eitt størri tal av pensjónistum. Lønargjaldingarnar veksa somuleiðis hjá kommununum hesi bæði árini. Almennu útreiðslurnar eru tí mettar at geva eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2025 og 2026.

Privatu íløgurnar væntast at geva eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2025, tí íløguvirksemið hjá privatu vinnuni er mett at verða hægri í 2025 enn í 2024. Privatu íløgurnar fevna um íløgurnar hjá húsarhaldunum, privatu vinnuni og fyritøkunum undir almennum ræði, sum framleiða vørur og tænastur til marknaðin. Íløguvirksemið hjá fyritøkum undir almennum ræði eru størri í 2025 enn í 2024, ið millum annað skyldast stórum íløgum hjá SEV og Vága Floghavn í 2025. Í 2025 geva íløgurnar eitt lítið positivt íkast til vøksturin í BTÚ. Í 2026 verður eisini mett eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ.

Almennu íløgurnar minkaðu í 2024 samanborið við 2023. Vakstrarískoyti frá almennu íløgunum verður væntandi somuleiðis negativt í 2025, tó verða íløgurnar mettar at veksa aftur í 2026.

Innflutningurin er minni í 2024 enn í 2023 og tað gevur eitt positivt íkast til vøksturin í BTÚ, tí nettoútflutningurin veksur. Størsta orsøkin til at innflutningurin lækkaði, var tí at innflutningurin av vørubólkinum ‘maskinum, motorum, skipum og akførum’ lækkaði 1 mia. kr. Tað er vanligt at stór sveiggj eru í hesum vørubólkinum. Harumframt hevur verkfall í mai og juni verið við til at minni er innflutt í 2024. Innflutningurin hækkar aftur í 2025 og 2026 í metingunum, tí virksemið veksur. Útflutningurin gav eitt negativt íkast til vøksturin í

BTÚ í 2024, men gevur væntandi eitt positivt íkast í 2025 og 2026. Hóast kvotulækkingar innan bæði uppsjóvar- og botnfiskarí, veksur tøkan av laksi væntandi so nógv, at útflutningurin sambært metingunum gevur positivt íkast til vøksturin í BTÚ í 2025 og 2026.

## Starvsfólk, lønargjaldingar og arbeiðsloysi

Talið av fólki í Føroyum í arbeiðsførum aldri, tað vil siga, tey sum eru millum 16 og 66 ár, hevur ongantíð verið so høgt sum nú. Starvsfólkatalið er somuleiðis sera høgt og arbeiðsloysið er framvegis á einum sera lágum støði, sí mynd 1.2.

**Mynd 1.2: Tal av starvsfólkum og fulltíðararbeiðsleysum, árstíðarjavnað**
Jan. 2020 til des. 2024




Kelda: Hagstova Føroya

Lága arbeiðsloysið á umleið 1% í januar 2025 merkir, at arbeiði er til allar hendur, ið stuðlar undir privatu nýtsluni. Tað er lítil og eingin munur á arbeiðsloysinum millum kynini. Búskaparliga hevur eitt ov lágt arbeiðsloysi í longri tíð tó ta avleiðing, at framleiðslan í landinum verður minni, enn hvat hon kundi verið, um trot ikki var á arbeiðsmegi. Fløskuhálsar kunnu koma vegna trot á arbeiðsmegi, og trot á arbeiðsmegi kann harumframt elva til lønartrýst, tá stórur eftirspurningur er eftir arbeiðsmegi og útboðið er avmarkað. Skipanirnar við at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya hava minkað um arbeiðstrotið og harvið eisini tálmað trýstið á lønarvøksrinum.

Sambært hagtølum hjá ALS og Starvsportalinum hevur talið av størvum, ið eru leys at søkja, verið minkandi síðani 2021. Í 2021 vóru góð 2.500 størv leys at søkja og áleið 38% av teimum vóru innan heilsuverk og umsorgan. Í 2024 vóru 2.100 størv leys at søkja, harav 42% innan heilsuverk og umsorgan. Her skal viðmerkjast, at almenn størv skula lýsast leys. Privati arbeiðsmarknaðurin er ikki bundin av somu reglum, tí kann eisini roknast við

at fleiri almenn størv verða lýst leys í mun til privat. Lítið av tulking kann leggjast í hesi tølini, men yvirskipað kann gongdin siga nakað um eftirspurningin á arbeiðsmarknaðinum og um trotið á arbeiðsmegi, sum út frá hesum tølunum ikki er eins stórt longur, sum tað hevur verið fyri trimum árum síðani.

Trotið á arbeiðsmegi minkar, tá ið ferðin í samfelagnum fer niður, hetta merkir tó ikki neyðturviliga, at trotið eftir ávísari fakligari arbeiðsmegi minkar. Sambært Vinnuhúsinum verður tað innan fá ár tørvur á 700 - 850 fólk afturat í privatu vinnuni við yrkisútbúgvingum og KT-førleikum[1]. Tað er eitt dømi á arbeiðsmegi, har eftirspurningurin ikki fer at minka við tíðini, men tvørturímóti fer at hækka. Eisini á til dømis eldra- og heilsuøkinum fer eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi at økjast komandi árini, orsaka av demografisku broytingunum.

### Talið av starvsfólki er minkað í privatu vinnuni

Hagtøl hjá Hagstovu Føroya vísa, at talið av starvsfólki er minkað í privatu vinnuni í 2024 í mun til 2023, meðan fleiri starvsfólk eru løgd afturat í almennari fyrisiting og tænastu í sama tíðarskeiði. Í 5-ára tíðarskeiðinum (2014 – 2019) undan Covid-19 í 2020 var vøksturin í talinum av starvsfólki tó munandi størri í vinnuni, enn í almennari fyrisiting og tænastu; talið av starvsfólki í vinnuni vaks 21%, meðan talið av starvsfólkum í almennari fyrisiting og tænastu vaks 13%. Verður hinvegin miðal árligi vøksturin roknaður fyri seinastu 10 árini, er talið av starvsfólki í miðal økt við á leið tveimum prosentum árliga í vinnuni og almennari fyrisiting og tænastu.

**Mynd 1.3: Starvsfólk í vinnu og tí almenna**




Viðm.: Vinna fevnir um starvsfólk hjá arbeiðsgevara í privatum ella almennum felagi, sjálvstøðugt vinnurekandi og felagsskapir (td. fótbóltsfeløg). Almenn fyrisiting og tænasta fevnir um lands-, kommunu- og ríkisfyrisiting og tænasta og sosialir grunnar.
Kelda: Hagstova Føroya.

Lutfallið millum starvsfólk í almenna og privata geiranum er tó ikki broytt seinastu 10 árini; í november 2014 arbeiddu 39% av starvsfólkunum í almennari fyrisiting og tænastu og 61% í vinnuni. Í november 2024 var lutfallið somuleiðis 39% í almennari fyrisiting og tænastu og 61% í vinnuni (les meira í kap. 06 um føroyska arbeiðsmarknaðin).

Í 2024 er talið av starvsfólkum minkað í millum annað í framleiðsluvinnuni (onnur matvøruframleiðsla). Í sama tíðarskeiði eru fleiri starvsfólk løgd afturat hjá bæði landi og kommunum innan heilsu og almannaverk (virksemi á stovnum). Møguliga kann verkfallið í 2024 og lønarhækkingar vera partar av orsøkini til stígin í talinum av starvsfólki í vinnuni.

### Meirilutin av nettotilflytingini eru útlendingar

Føroyar høvdu í 2024 eina nettotilflyting, við nettotilflytingin av útlendingum, meðan tað var nettofrátflyting av føroyingum, sí mynd 1.4. Síðani 2021 hevur meirilutin av nettotilflytingini til Føroya verið útlendingar. Nettotilflytingin av útlendingum í arbeiðsførum aldri var á sínum hægsta stigi í 2022, er minkað síðan. Tað hevur verið ein stór tilgongd av útlenskum starvfólkum seinastu árini. Í 2009 høvdu 3% av starvsfólkunum í samlaða búskapinum útlendsk, í 2024 var parturin hækkaður til 8%, ið svarar til á leið 2.300 starvsfólk. Serliga síðani fast track skipanin kom í november 2021 hevur tilgongdin verið stór. Í 2022 var vøksturin í útlendskari arbeiðsmegi 24%, í 2023 var vøksturin 10 % og í 2024 2%. Tvs. at tað er líkt til at stóra tilgongdin av útlendksum starvsfólkum er hæsað av. Les meira um arbeiðsmarknaðin í kap. 06.

**Mynd 1.4: Nettotilflytingin til Føroyar 2015-2024**




Kelda: Hagstova Føroya.
Viðm: Føroyingar eru danskir ríkisborgarar, og útlendingar eru tey ið hava annan ríkisborgaraskap enn danskan

Talva 1.2 niðanfyri vísir lønargjaldingarnar í samlaða búskapinum. Í talvuni sæst at samlaðu lønargjaldingarnar í 2024 vóru 12,7 mia. kr., ein vøkstur á 5% samanborið við árið fyri. Síðani 2020 (Covid-19) hevur árligi vøksturin í lønargjaldingum ligið ímillum 4 og 6%.

**Talva 1.2 Lønargjaldingar í samlaða búskapinum**

| Mia. kr. | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vinnan | 6,7 | 6,9 | 7,4 | 7,8 | 8,1 |
| Tað almenna | 3,7 | 3,9 | 4,1 | 4,3 | 4,7 |
| Samlaði búskapurin | 10,4 | 10,8 | 11,5 | 12,1 | 12,7 |
| Árligur lønarvøkstur í samlaða búskapinum í prosentum | 2% | 4% | 6% | 6% | 5% |

Viðm.: máldar lønargjaldingar á hvørjum árið, januar til desember á hvørjum ári.
Kelda: Hagstova Føroya.

## Inflatión

Brúkaraprístalið, hvørs árligu broytingar er eitt mát fyri inflatiónina í Føroyum, hækkaði í triðja ársfjórðingi í 2024 við 1,8% samanborið við sama ársfjórðing í 2023, og 0,8% í fjórða ársfjórðingi í 2024 samanborið við sama ársfjórðing árið fyri, sí mynd 1.5.

**Mynd 1.5: Inflatión, %-broyting í brúkaraprístalinum og vakstrarískoyti 2015-2024**




Viðm.: Annað er 02 rúsdrekka og tubbak, 03 klædnavørur og fótbúnaður, 05 húsbúnaður og húshaldsútgerð, 06 heilsa, 08 samskifti, 09 frítíð og mentan, 10 útbúgving, 11 hotel og matveitarar og 12 ymiskar vørur og tænastur.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar

**Matvøruprísirnir veksa framvegis**
Prísirnir veksa nú við lægri ferð, enn seinastu trý árini. Meðan býli og flutningur geva negativt íkast til inflatiónina, veksa prísirnir á mat- og drykkjuvørum framvegis, sí mynd 1.5.

Í 2021 byrjaði inflatiónin at taka dik á seg. Í fyrsta umfari vóru tað millum annað prísirnir á býli og flutningi (serliga brennievni), sum góvu íkast til vaksandi inflatiónina. Í 2022 hendi eitt lop í matvøruprísunum, sí mynd 1.6, og mat- og drykkjuvørur byrjaðu somuleiðis at geva íkast til inflatiónina. Mynd 1.6 vísir, at frá fjórða ársfjórðingi 2022 til fyrsta ársfjórðing 2023 fór vísitalið fyri rentuútreiðslur til sethús, úr 51 upp í 109. Sostatt vóru tað serliga øktu rentuútreiðslurnar, sum gjørdu, at býli gav eitt positivt íkast til vøksturin í brúkaraprístalinum í hesum tíðarskeiðinum. Vísitalið fyri rentuútreiðslur varð hægst fjórða ársfjórðing 2023, og hevur síðan verið fallandi.

Á mynd 1.3 sæst, at prísurin á ravmagni og hita (ið fevnir um ravmagn, brenniolju og fjarhita) sveiggjar nógv, tó er tað bert brennioljan, ið sveiggjar nógv í prísi, meðan prísirnir á ravmagni og fjarhita sveiggja væl minni.

**Mynd 1.6: Brúkaraprístalið, vísitøl fyri mat- og drykkjuvørur og býli**




Viðm.: Býli fevnir undirbólkarnir: 'Sethús-rentuútreiðslur', 'ravmagn og hiti', 'húsaleiga' og 'viðlíkahald av bústaði'., myndin til høgru hevur bert 'Sethús-rentuútreiðslur' og 'ravmagn og hiti' við, tí hesir báðir undirbólkar vekta mest í vísitalinum fyri 'býli'.
Kelda: Hagstova Føroya.

Sum heild er tað heft við óvissu, tá metast skal um viðurskifti, sum toga inflatiónina í Føroyum upp. Hetta kemur av, at samansetingin av vørunum og tænastunum í brúkaraprístalinum er gjørd út frá eini brúkarakanning í 2007. Tað merkir, at brúkaraprístalið hevur ta fortreyt, at føroyingar ikki hava broytt sítt nýtslumynstur í øllum hesum tíðarskeiðinum. Hetta metir Búskaparráðið vera ósannlíkt og mælir til, at samansetingin av ymsu vøru- og tænastubólkunum í brúkaraprístalinum verður dagførd[2].

# Altjóða útlit

Sambært altjóða gjaldoyragrunninum, IMF, er vøksturin í heimsbúskapinum mettur at verða 3,3% í 2025 og 2026, og tað er lægri, enn vøksturin í miðal hevur verið í 20 ára tíðarskeiðinum frá ár 2000 til 2019. Inflatiónin er í altjóða høpi mett at lækka niður í 4,2% í 2025 og síðani 3,5% í 2026, og IMF metir, at inflatiónin førkar seg móti langtíðar málinum um eina javna og lága inflatión á áleið 2%. Inflatiónin verður togað niður av lágum prísvøkstri í teimum framkomnu londunum, sum royna at basa inflatiónini. Stimbrandi fíggjarpolitikkur kann tó í ymsu londunum mótvirka árinini av pengapolitisku tiltøkunum, sum eru sett í verk fyri at fáa tamarhald á inflatiónini. Eitt dømi um hetta er, at innlendis eftirspurningurin væntast at veksa í USA orsakað av førda fíggjarpolitikkinum, og tað kann toga inflatiónina upp í USA. Hinvegin eru útlitini um búskaparvøkstur ikki eins góð í Evropa; høgu orkuprísirnir og almenna skuldin í summum av evropeisku londunum, kann elva til lægri búskaparvøkstur í Evropa. IMF mælir sum heild londunum til at umhugsa hvørjar avleiðingar stimbrandi fíggjarpolitikkur hevur á inflatiónina og mælir til, at londini leggja dent á at fremja bygnaðarligar broytingar, sum stuðla undir nýskapan og kappingføri og sostatt vøkstri í búskapinum í langa høpinum[3].

### ECB hevur lækkað rentuna

Evropeiski tjóðbankin, ECB, hevur lækkað rentuna fimm ferðir higartil á hesum sinni; í juni, september, oktober og desember 2024 og aftur í januar 2025. Og fíggjarmarknaðurin væntar enn fleiri rentulækkingar í 2025. ECB metir, at inflatiónin í Evropa fer at nærkast 2% í 2025. Danski tjóðbankin lækkar sínar rentur samsvarandi rentulækkingunum hjá ECB, ið síðani elvir til, at føroysku peningastovnarnir væntandi eisini lækka sínar rentur mótvegis kundunum.

ECB metir, at pengapolitikkurin framvegis virkar tálmandi á búskapin, hóast rentan er lækkað. Tað vil siga, at rentan er framvegis hægri enn neutrala rentan, sum er rentan, ið hvørki tálmar ella stimbrar búskapin. Neutrala rentan er mett at liggja millum 1,75% og 2,25%. Fer geopolitiski ófriðurin at órógva útboðið av orku, fer tað at hava dýrari orkuprísir við sær, ið dýrka bæði framleiðslu og flutningsprísir. Um so er, fer inflatiónin møguliga ikki at minka eins skjótt, sum áður mett. Veksa lønirnar skjótari, enn væntað, kann tað somuleiðis birta uppundir eini veksandi inflatión. Lágt bjartskygni og stúranir um geopolitisku støðuna, kunnu hinvegin tálma prísvøksturin gjøgnum lága privata nýtslu og íløguhug.

Vøksturin í evropeiska búskapinum er lágur; í framleiðsluvinnum gongur afturá, ímeðan virksemið í tænastuvinnunum er í framgongd. Bjartskygnið hjá húsarhaldunum í Evropa sum heild er tó ikki batnað so mikið enn, at tað sæst aftur á privatu nýtsluni. Arbeiðsloysið er tó lágt, og økta keypiorkan, sum húsarhaldini hava fingið gjøgnum lønarhækkingar, kann saman við rentulækkingunum, stuðla uppundir privatu nýtsluni og íløguhugin, soleiðis, at evropeiski búskapurin fer at koma skjótari fyri seg.[4]

**Mynd 1.7 Mettur vøkstur í BTÚ í føstum prísum, 2025 og 2026**




Kelda: IMF.

### Geopolitiski ófriðurin kann órógva bjartskygnið

Fíggjarmarknaðirnar hava verið órógvaðir av, at amerikanski forsetin hevur hótt við at leggja eyka toll á vørur innfluttar úr Kina, Kanada, Meksiko og ES. Ein eyka tollur á vørur úr Evropa kann fyri Føroyar merkja, at tollur eisini verður lagdur á føroyskar vørur, sum verða útfluttar til USA. Føroyar útflyta laks til USA, og ein tollur hækkar prísin á laksinum í USA. Sostatt verður laksurin dýrari fyri keyparan at keypa, og tað kann ávirka eftirspurningin eftir laksi frá føroysku laksaútflytarunum.

Tollur á evropeiskar vørur sum heild kann hava við sær, at evropeiskar vørur missa kappingarføri á amerikanska marknaðinum, og tað kann hava lægri búskaparligt virksemi við sær í teimum londum í Evropa, sum í stóran mun útflyta til USA. Um búskaparvøksturin slakast í Evropa orsakað av amerikanska tollinum, kann keypiorkan hjá brúkarunum á okkara útflutningsmarknaðum í Evropa minka, og tað kann ávirka eftirspurningin eftir okkara fiskavørum neiliga.

Í 2024 fór 45% av føroyska vøruútflutninginum til ES og 15% til USA. Ein stórur partur av laksinum fer til ES (55%), ímeðan 27% fer til USA og 12% til Asia. Laksaútflutningurin er øktur til USA og steðgaður til Russlands eftir at Russland gjørdi innrás í Ukraina í 2022. Okkara botnfiskavørur fara í stóran mun til ES, meðan uppsjóvarfiskur í stóran mun fer til Russlands, og síðani ein minni partur til ES. Ein tollur á okkara útflutningsvøru og hvussu búskaparliga gongdin annars er á okkara útflutningsmarknaðum, kann sostatt hava stóra ávirkan á smáar búskapir sum tann føroyska, serliga tí útflutningurin fyllir nógv í mun til BTÚ.

# 02
# Húsarhaldini

Nýtslan hjá húsarhaldunum er ein stórur partur av samlaða eftirspurninginum í føroyska búskapinum. Tí kunnu broytingar í teimum viðurskiftunum, sum ávirka nýtsluna, fáa stóra ávirkan á virksemi í samfelagnum. Ynskiligt hevði verið við neyvari uppgerðum av sjálvari privatu nýtsluni í samlaða eftirspurninginum í tjóðarroknskapinum. Men tá hetta ikki er tøkt verður í staðin hildið eyga við nøkrum viðurskiftum, ið sannlíkt ávirka nýtsluna jaliga og neiliga. Hesi viðurskifti eru millum annað vísitølini í konjunkturbarometrinum hjá Hagstovuni, gjaldskortnýtslan sambært uppgerðum frá bankunum, bilakeyp sambært Akstovuni og bústaðarbyrðan uppgjørd av Betri Banka.

### Bjartskygnið hjá húsarhaldunum er lækkað

Nýtslan hjá húsarhaldunum er millum annað tengd at teirra bjartskygni, ið verður lýst við vísitølum í konjunkturbarometrinum, sum er ein brúkarakanning hjá Hagstovu Føroya. Vísitalið vísir millum annað, hvussu brúkarin metir búskaparstøðuna vera.

Treystið hjá føroysku húsarhaldunum er lækkað eitt vet; í nýggjastu kanning var tað -12, sí mynd 2.1. Vísitalið minkaði nógv í 2022; tá minkaði tað niður í -17, men síðani tá hevur gongdin verið uppeftir gangandi, hóast tað framvegis er undir miðal. Vísitalið hevur fyrr verið enn lægri enn tað er í løtuni; í fíggjarkreppuni í 2008 var vísitalið -37. Samanumtikið hevur brúkaraávísin verið undir miðal síðan mitt í 2022, ið millum annað kann síggjast í ljósinum av stórum príshækkingum á nýtsluvørunum hjá húsarhaldunum og einari spentari geopolitiskari støðu, ið hevur stórar óvissur knýttar at sær.

Hóast metingin hjá húsarhaldunum um teirra fíggjarstøðu seinastu og komandi 12 mánaðirnar kvinka eitt vet upp, umframt at eitt sindur fleiri húsarhald svara, at tey vænta at gera størri keyp komandi árið, ger negativa metingin hjá húsarhaldunum um búskaparstøðuna í Føroyum komandi 12 mánaðirnir, at brúkaraávísin kvinkar niður í nýggjastu brúkarakanningini.

Hagstova Føroya hevur dagført, hvussu brúkaraávísin verður uppgjørdur, og eru tað aðrir spurningar sum nú samanvigað geva brúkaraávísan. Tað sæst eitt niveauskifti í brúkaraávísinum, sum er lægri samanborið við gamla uppgerðarháttin.

Fíggjarstøðan hjá húsarhaldunum er sum heild góð. Tá húsarhaldini meta um sína fíggjarstøðu í brúkarakanningini, eru tað 55% av teimum spurdu, sum svara, at tey spara nakað upp, og 5% spara nógv upp. 28% fáa endarnar júst at røkka saman. Hetta eru væl færri enn rundanum um fíggjarkreppuna, tá yvir 40% júst fingu endarnar at røkka saman. Í 2022 vóru tað umleið 20% sum júst fingu endarnar at røkka saman, og síðani er hesin partur vaksin á hvørjum ári. Umleið 8% av teimum spurdu søgdu, at tey mátta brúka burturav uppsparingini.

**Mynd 2.1: Brúkaraávísi 2019-2025**




Viðm.: "Miðal" er miðal av mátingum frá 2006 til 2025.
Kelda: Hagstova Føroya

## Ein størri partur av nýtsluni er uttanlands

Kortnýtslan hjá føroysku húsarhaldinum var eitt vet hægri í 2024 samanborið við 2023, sí mynd 2.2. Gongdin mánað fyri mánað í 2024 var meinlík gongdini í 2022 og 2023, tó undantikið juni mánað, har kortnýtslan var sera lág vegna manglandi vørur í føroysku handlunum, ið stóðst av verkfallinum.

**Mynd 2.2: Kortnýtsla hjá føroyingum í Føroyum og uttanlands samanlagt 2021-2024 (til vinstru), Kortnýtslan í Føroyum og uttanlands 2019-2024 (til høgru)**




Viðm.: Hagtølini á myndini til vinstru eru deflateraði við brúkaraprístalinum (egnar útrokningar). Talan er um kortnýtsluna hjá kundum hjá Betri Banka og Føroya Banka, sum fevnir um umleið 85% av samlaða kundaskaranum
Kelda: Føroya Banki og Betri Banki

Ein alsamt størri partur av kortnýtsluni verður nýttur uttanlands. Í 2019 vórðu góð 20% av kortnýtsluni nýtt uttanlands, í 2020 fall hetta vegna Covid-19, men síðani er kortnýtslan uttanlands vaksin á hvørjum árið, og í 2024 vóru 30% av samlaðu kortnýtsluni nýtt uttanlands. Havast skal í huga, at kortnýtslan uttanlands ikki bert fevnir um nýtslu í samband við ferðing uttanlands, men eisini millum annað um hald til stroymingtænastur, spøl á netinum og vørukeyp á útlendskum heimasíðum.

### Húsarhaldini eru vorðin meira varin við at gera størri keyp

Seinastu árini er nýtslumynstrið hjá føroysku húsarhaldunum broytt. Sambært Handilsvinnufelagnum hava stórar príshækkingar viðført, at húsarhaldini eru farin at keypa lágprísvørur heldur enn eitt nú vistfrøðiligar vørur. Ein umráðandi konjunkturávísi er bilasøla. Bilasølan kann geva ábendingar um privatu nýtsluna í síni heild. Tá ið fólk gerast meira varin, gongur tað serliga útyvir drúgvar vørur, og serliga størru íløgurnar, so sum bilar. Fólk kunnu útseta at keypa sær nýggjan bil, ella tey kunnu velja at keypa ein brúktan bil ístaðin fyri ein nýggjan. Myndin niðanfyri vísir samlaðu bilamongdina av persónbilum til privata nýtslu og árligu broytingina seinastu árini.

**Mynd 2.3: Bilamongd og árliga broytingin**

Persónsbilar til privata nýtslu




Kelda: Akstovan

Á myndini sæst, at bilamongdin vaks á leið ímillum 3% og 5% um árið í árunum 2017 og til 2021. Í 2022 vaks bilamongdin stórt sæð ikki og nýggjastu tølini fyri 2024 vísa, at bilamongdin vaks við hálvum prosenti.

Myndin niðanfyri vísir bilasøluna seinastu fimm árini. Seinastu trý árini er árliga bilasølan lækkað við ávikavist 17%, 4% og og seinasta árið við 6%. Í 2020 var parturin av sølu av

nýggjum bilum 17% og í 2024 var parturin 11%. Ein størri prosentpartur av bilasøluni er tí søla av brúktum bilum. Í tølunum av brúktum bilum er eisini parturin av innfluttum brúktum akførum, ið er vaksin seinasta árið og fór úr 155 í 2023 til 225 í 2024. 83% av teimum vóru trý ár ella yngri. Tað er tí líkt til at sama mynstur, sum Búskaparráðið vísti á í Várfrágreiðingin í 2024, heldur á fram. Samlað sæð verða færri bilar seldir og ein størri partur av samlaðu bilasøluni er brúktir bilar og alsamt fleiri av innfluttu brúktu bilunum eru trý ár ella yngri.

**Mynd 2.4: Bilasøla til privata nýtslu**

Árini 2020-2024 og 2017-2025




Viðm.: Bilasøla av persónsbilum til privata nýtslu. Ein lítil mangul er í tølunum av seldum leigubilum, tí nakrar skrásetingar mangla. Tær telja tó einans 5,7% av samlaðu brúktbilasøluni í 2023 og tí skal væntast at brúktbilasølan er eitt lítið vet hægri í 2024 enn víst her.

Kelda: Akstovan

Samanumtikið hevur bilamongdin staðið í stað seinastu trý árini, har hon undanfarnu 5 árini vaks støðugt. Sølan av nýggjum og brúktum bilum er lægri seinastu trý árini, sum týðir uppá, at fólk eru vorðin meira varin við at gera stór keyp.

Atferðarmynstrið hjá bilkeyparanum vísir, at keyparin er viðkvæmur fyri broytingum í stuðulsskipanum, tí sølutølini vísa, at fleiri sølur vera gjørdar upp til stuðulsskipanin verður broytt, eitt nú tá mvg-afturberingin til elbilar bleiv broytt 1. apríl 2024 og aftur 1. januar 2025. Tað er tí eisini vert at leggja afturat, at tað kann hugsast, at fólk hava valt at gera eina íløgu í at skifta yvir til eina grønu orkuskipan, tí tann stuðulsskipanin varð eisini broytt 1. januar 2025, í staðin fyri at skifta bilin út, og tað kann hava havt eina ávirkan á samlaða talið av bilasølum.

### Sethúsaprísirnir eru øktir

Sethúsaprísirnir eru øktir nærum 6% í Tórshavn í 2024 í mun til árið fyri. Miðalprísurin er nú nærum 4 mió. kr. í Tórshavn. Í sama tíðarskeiði eru teir øktir við góðum 4,5% í størru

bygdunum, og við 10,5% í smærri bygdunum. Íbúðarprísurin í Tórshavn er øktur 6,5% í 2024 samanborið við 2023. Í 2023 hækkaðu sethúsaprísirnir ikki í Tórshavn, men íbúðaprísirnir hækkaðu, og í størri bygdunum og í Sandoy/Suðuroy lækkaðu sethúsaprísirnir í 2023 samanborið við árið fyri. Allarhelst hava rentuhækkingarnar, sum byrjaðu á sumri 2022 tálmað prísvøkstrinum á sethúsamarknaðinum. Í 2024 sæst aftur vøkstur, og tað kemur millum annað av rentulækkingunum (umframt lønarvøkstri og skattalætta) og at búskaparliga gongdin er góð, sum merkir, at flest øll eru í starvi og kunnu røkja sínar fíggjarligu skyldur.

**Mynd 2.5: Miðal sethúsaprísir, 2009 – 2024**




Kelda: Føroya Banki.

### Tað er torførari at sleppa inn á sethúsamarknaðin

Betri Banki hevur roknað bústaðarbyrðuna; bústaðarbyrðan er eitt roknað dømi, sum lýsir, hvussu stórur partur av inntøku eftir skatt hjá einum pari við tveimum børnum undir 7 ár fer til at afturgjalda bústaðarlán. Hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn og rentan á láninum er ein miðalrenta, sum umboðar rentustøðið í ávísa árinum. Støddin á bústaðarláninum svarar til 90% av aktuella miðal sethúsaprísin í ávísa økinum og ásett er, at parið hevur 10% í eginfígging (Betri Banki hevur dagført fortreytirnar um afturgjaldstíð og eginfígging, so útrokningarnar betur umboða lánstreytirnar í dag, sí [5]).

Í árunum eftir fíggjarkreppuna lækkaði rentan og húsarhaldini fingu lønarhækkingar meðan prísstøðið var lágt, men sethúsaprísirnir vuksu støðugt, og tað sæst aftur í eini øktari bústaðarbyrðu frá áleið 2015 og fram. Bústaðarbyrðan er økt nógv í 2023 og 2024 orsakað av rentuhækkingunum, sum byrjaðu í 2022. Nýggjastu tølini, sum Betri Banki hevur uppgjørt vísa, at bústaðarbyrðan var 42% í Tórshavn, 26% í Klaksvík og Føroyum sum heild, og 22% í Eysturoynni í 2024. At bústaðarbyrðan er økt kann vera ein av orsøkunum

til, at fleiri húsarhald í 2023 og 2024 siga seg júst fáa endarnar at røkka saman, enn tað vóru í 2022.

**Mynd 2.6: Bústaðarbyrða 2006 – 2024**




Viðm.: Bústaðarbyrðan lýsir hvussu stóran part av inntøkuni eftir skatt hjá einum pari við tveimum børnum undir 7 ár fer til at afturgjalda bústaðarlán. Hvør persónur í parlagnum tjenar eina miðalløn, lánið er eitt annuitetslán á 30 ár við 10% eginfígging, rentan er ein miðalrenta vektað eftir rentudøgum. Støddin á láninum svarar til 90% av miðal sethúsaprísin í økinum.
Kelda: Betri Banki.

Hvørt bústaðarbyrðan í Føroyum er stór ella ikki samanborið við onnur lond ber tí illani til at siga við vissu, tí hon verður ikki roknað á sama hátt. Útrokningar hjá Nordea vísa, at bústaðarbyrðan í Danmark í 2024 eitt nú var umleið 46% í miðstaðarøkinum og 25% í øllum landinum[6]. Bústaðarbyrðan í Føroyum er tó ikki samanberilig við tí donsku, tí danska bústaðarbyrðan verður roknað sum partur av tøku inntøkuni hjá einum pari við tveimum børnum, har 80% av láninum er eitt 30 ára realkredittlán og 15% eitt bankalán, soleiðis at eginfíggingin er 5%. Harumframt eru skattaviðurskiftini øðrvísi í Danmark (eitt nú gjalda tey jarðar- og ognarskatt), og Nordea hevur í hesum døminum roknað donsku bústaðarbyrðan fyri eini sethús á 140 fermetrar[7].

# 03
# Vinnan

Gongdin í vinnuni er ein ábending fyri búskaparligu støðuna og framtíðarútlitini í stutta sýninum. Byggivinnan, handilsvinnan, tænastuvinnan og tilfeingisvinnan og annar ídnaðar eru høvuðsvinnugreinarnar í føroyska búskapinum og hava stóra ávirkan á arbeiðsmarknaðin, búskapin, útflutningin og gongdina í samfelagnum sum heild.

### Treystið í byggivinnuni er versnað

Byggivinnan er serliga viðkvom fyri sveiggjum í búskapinum, tí hon er tengd at íløguhuganum hjá bæði almennum og privatum aktørum. Ráðgevarafyritøkurnar hava sambært Rágevarafelagnum minni at gera, og hetta kann vera eina ábending um at færri verkætlanir verða til byggivinnuna komandi tíðina. Gongdin í byggivinnuni hevur annars verið góð seinastu mongu árini við stórum starvsfólkavøkstri og lønargjaldingum. Vinnan hevur tó verið ávirkað av bæði covid-19 og síðani rentuhækkingum og høgum tilfarsprísvøkstri.

**Mynd 3.1: Byggivinnan ávísi jan. 2019 – jan. 2025**




Kelda: Hagstova Føroya

Ávísin hjá byggivinnuni er triðja hálvárið á rað fallin, og er í seinastu kanningini farin niðurum miðal. Byggivinnan boðar frá færri bíleggingum. Ordrabøkurnar eru sambært seinastu kanning 10 mánaðir, ið er ein lækking á 3 mánaðir samanborið kanningina í juni 2024. Harumframt væntar byggivinnan, at arbeiðstørvurin verður minni komandi árið. Eitt nú svarar eingin fyritøka í hesi kanningini, at mangul á arbeiðsmegi er ein forðing í framleiðsluni, ið annars fleiri byggifyritøkur hava boðað frá í undanfarnum kanningum.

Hinvegin er tað serliga veðrið; fíggjarligar avmarkingar, eitt nú rentuhækkingar og økt krøv frá bankunum, umframt aðrar avmarkingar, sum hava verið ein forðing fyri framleiðsluni

sambært nýggjastu kanningini. Tað er ikki heilt greitt í kanningini, hvørjar fíggjarligar avmarkingar talan er um, tó kann ein frágreiðing vera trygdin, sum byggifyritøkan skal seta í sambandi við eina byggiverkætlan. Bankarnir hava broytt mannagongdina, soleiðis at trygdin nú verður roknað uppí millumverandi millum bankan og byggifyritøkuna. Um nógvir pengar eru bundnir upp í trygd, er minni at brúka til aðrar byggiverkætlanir. Tað vanliga er, at trygdin er um 15% tá bygt verður, og trygdin lækkar eftirfylgjandi, tá ið verkætlanin verður handað og lækkar síðani aftur, tá eitt ár er farið. Verður verkætlanin ikki endaliga avgreidd millum byggifyritøkuna og byggiharran, kann trygdin standa upp til fimm ár fram. Hetta kann binda nógvan kapital hjá byggifyritøkunum.

### Handilsvinnan er meira bjartskygd, enn í undanfarnum kanningum

Handilsvinnan gevur eitt innlit í keypiorkuna hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Ávísin hjá handilsvinnuni fer frá 4 til 13. Ávísin fyri væntaða sølu kvinkar eitt vet upp, meðan ávísin fyri søluna seinasta árið kvinkar eitt vet niður. Harumframt svaraðu 87% av spurdu fyritøkunum at goymslan var nøktandi.

**Mynd 3.2: Handilsvinnan ávísi jan. 2019 – jan. 2025**




Kelda: Hagstova Føroya

Smásøluvísitalið lýsir gongdina í umsetninginum hjá smásølu, har 2015 verður sett til 100. Mynd 3.3 vísir gongdina í søluni í útvaldum vørubólkum. Sølan av innbúgvi, húsarhaldsútgerð og klæðum fellur. Hetta kann eisini hava ein samanhang við veksandi netkeypi, sum kortnýtslan eisini týðir uppá. Smásøla av ítróttarútgerð veksur.

Síðan 2022 er smásølan í handlum, har dentur verður lagdur á mat- og drykkjuvørur, vaksin vegna stórar príshækkingar. Sambært Handilsvinnufelagnum, hava brúkararnir síðan stóru príshækkingarnar í størri mun keypt bíligari vørumerkir og tilboðsvørur enn frammanundan.

**Mynd 3.3: Smásøluvísitøl í útvaldum handlum trendur í ársins prísum, 2014-2024**




Kelda: Hagstova Føroya

### Eftirspurningurin í tænastuvinnuni er vaksin

Tænastuvinnan fevnir um eina breiða viftu av fleiri vinnugreinum, alt frá flutningsfyritøkum, matstovu og hotellvirksemi og aðrar tænastur sum eitt nú grannskoðanarfyritøkur og advokatskrivstovur. Sambært nýggjasta konjunkturbarometri fer ávísin hjá tænastuvinnuni frá -8 upp til 9, ið er yvir miðal. Gongdin í tænastuvinnuni hevur verið betri í seinastuni, og samlaði eftirspurningurin er vaksin. Hetta hongur væl saman við starvsfólkatølunum í tænastuvinnuni. Ávísin fyri væntaða umsetningin komandi árið kvinkar tó niður.

**Mynd 3.4: Tænastuvinnan ávísi jan. 2019 – jan. 2025**




Kelda: Hagstova Føroya

### Tilfeingisvinnan er bjartskygd um framleiðsluna

Av tilfeingisvinnunum stóð fiski- og alivinnan fyri 93% av vøruútflutninginum í 2024, sum var 12,3 mia. kr. Ávísin fyri tilfeingisvinnur og annan ídnað er farin úr -33 upp í -3. Hóast hetta er undir miðal, so er tilfeingisvinnan og annar ídnaður væl meira bjartskygd í nýggjastu kanningini. Bíleggingarnar eru fleiri og vinnan er meira bjartskygd um framleiðsluna komandi árið, enn í seinastu kanning. Harumframt er goymslan minni enn í seinastu kanning.

Orsøkin til, at væntaða framleiðslan veksur, stavar helst frá, at alivinnan veksur munandi um framleiðsluna í ár og komandi ár. Framleiðslan hjá fiskivinnuni verður væntandi minni komandi árið, vegna minkandi kvotur, eitt nú fellur toskakvotan í Barentshavinum og kvotan av norðhavssild fer niður í eina helvt. Væntanirnar til søluprísir eru góðar, ið kann stava frá minkandi kvotum. Toskaprísurin varð ógvuliga góður í 2024 og prísvánirnar eru góðar fyri 2025, tí kvotan í Barentshavinum fellur, og hetta hevur ávirkan á marknaðarprísin. Høgi toskaprísurin ávirkar eisini prísin á hýsu og øðrum fiskasløgum, ið somuleiðis hækkar, tí at kundarnir ístaðin keypa hesi fiskasløg, um toskurin verður ov dýrur.

Prísurin á makreli var góður í 2024 og verður væntandi enn hægri í miðal í 2025, av tí at ein stórur partur av kvotuni verður fiskaður í háárstíð í bretskum sjóøki.

**Mynd 3.5: Tilfeingisvinnan og annars ídnaður ávísi jan. 2019 – jan. 2025**




Kelda: Hagstova Føroya

04

# Uttanlandshandil

### Tað er framvegis avlop á handilsjavnanum

Myndin niðanfyri vísir gongdina í inn- og útflutninginum av vørum, umframt handilsjavnan. Á myndini sæst at handilsjavnin, sum er útflutningurin minus innflutningin, er positivur øll árini aftur til 2015. Avlopið er vaksið frá 2023 til 2024, og var í 2024 2 mia. kr. Sum tað sæst á myndini, er grundin tann, at hóast útflutningurin minkaði, so minklaði innflutningurin uppaftur meira.

**Mynd 4.1: Inn- og útflutningur, umframt handilsjavni 2015-2024**




Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar

### Innflutningurin minkaði í 2024

Innflutningurin í 2024 minkaði 1,5 milliard kr. samanborið við 2023. Størsta broytingin í innflutningunum stavaði frá høvuðsbólkinum 'maskinur, motorar, skip og akfør', ið er minkaður áleið eina milliard kr., sí mynd 4.2. Ein frágreiðing er, at innflutningurin av akførum minkaði við 18% frá 2023 til 2024, men tað er afturgongdin í 'skip og onnur flutningstól', sum var 57%, ið hevur størst ávirkan. Skip eru íløgur, sum eru framleiddar í útlondum, og skipakeyp kann flyta nógv uppá innflutningstølini, tí virðið á einstøku skipunum kunnu vera ómetaliga høg samanborið við aðrar innflutningsvørur.

Innflutningurin av brennievni og øðrum oljum fall góðar 200 mió. kr. í 2024. Innflutningurin av brennievni og øðrum oljum er samstundis fallin í nøgd, eini 17 tús. tons, sí mynd 4.2. Verður hugt enn longur aftur í tíð sæst, at innflutningurin av ráolju og framleiðslu úr olju er farin frá sløkum 370 tús. tons í 2020 niður í 290 tús. tons í 2024.

Innflutningurin í høvuðsbólkinum ‘matvørur og livandi djór’ fellur bæði í mongd og virði frá 2023 til 2024. Tað er serliga innflutningurin av vørubólkinum ‘fiskur, skeljadjór, lindýr og vørur úr teimum’, ið hálar niður. Talan er fyri tað mesta um fisk, ið fiska- og mjølvirkir innflyta fyri at tilvirka. Um hugt verður nærri at matvørum, sæst at innflutningurin av eitt nú ‘frukt og grønmeti’ og ‘kjøt og kjøtvørum’ er minkaður bæði í nøgd og virði. Sannlíkt er, at verkfallið í mai og juni mánaði er høvuðsorsøkin.

Innflutningurin av ráevnum til framleiðslu fellur í virðið, men veksur í nøgd. Meðan innflutningurin av ‘tøð og mineralum’, umframt ‘timbur og tundur’ veksur eitt sindur í 2024, fellur innflutningurin av ‘plantu- og djórarunnum evnum’.

**Mynd 4.2: Innflutningur býttur á ávísar SITC høvðusbólkar í virði og nøgd**




Viðm.: Annað er drykkjuvørur og tubbak, djóra- og plantuoljur, evnafrøðiligt tilfar, ídnaðarvørur flokkaðar eftir ráevni, ymiskar framleiddar vørur, vørur ikki neyvari flokkaðar.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

### Helmingurin av vøruútflutningurin er laksur

Í 2024 var vøruútflutningurin 12,3 mia. kr., og umleið 47% av útflutningsvirðinum stavaði frá útflutningi av laksi, meðan 53% stavaði frá øðrum vørum, serliga fiskavørum. Útlit eru til at útflutningurin av fiskavørum fellur í 2025 og 2026 orsakað av kvotulækkingum. Toskakvotan í Barentshavinum fellur, kvotan av norðhavssild verður minkað niður í helvt, samstundis sum makrelkvotan eisini minkar. Útlit eru eisini til, at útflutningurin av fiskamjøli, lýsi og fóðuri minka. Útflutningurin av fiskamjøli fellur munandi í metingunum. Ein orsøk er, at meira fiskamjøl fer til fóðurframleiðslu, sum avleiðing av at framleiðslan av laksi veksur munandi komandi tvey árini. Á mynd 4.3 sæst, at tað er laksaútflutningurin, sum drívur metta vøksturin í vøruútflutninginum. Útlit eru til, at tøkunøgdin av laksi veksur

munandi í ár og komandi ár. Orsøkin er, at stórar íløgur eru gjørdar í kapitaltólið, ið skulu gera, at smoltið kann vera longri á landi. Tað merkir, at smoltstøddin verður størri, tá ið smoltini fara út í aliringarnar, og hetta styttir um tíðina á havinum og økir um skiftistíttleikan á avmarkaðu aliøkjunum.

**Mynd 4.3:Vøruútflutningur 2015-2024 og metingar fyri 2025-2026**




Viðm.: 2025 og 2026 eru metingar
Kelda: Hagstova Føroya og metingar hjá Búskaparráðnum.

### Laksaútflutningurin hevur stóran týdning fyri gongdina í útflutninginum

Mynd 4.4 vísir hvørji fiskasløg hava givið íkast til vøksturin í útflutninginum seinastu fimm árini. Sveiggini í laksaútflutninginum hava flestu árini havt stóran týdning fyri, um útflutningurin veksur ella minkar. Serliga í 2021 og 2022 gav laksaútflutningurin positivt íkast til vøksturin í útflutninginum, hinvegin dregur laksaútflutningurin niður í 2023 vegna minni tøkunøgd.

Í 2022 og 2023 vaks útflutningurin av fóðuri, fiskamjøli og lýsi, millum annað vegna hækkaða svartkjaftakvotu. Í 2023 var tað serliga útflutningurin av fiskamjøli og lýsi sum vaks. Tá var svartkjaftakvotan framvegis sera stór, men harumframt varð nógvur makrelur landaður til ídnað, tí lýsiprísurin var serstakliga høgur vegna veðurfyribrigdið el niño. Tað vóru sostatt serstøk viðurskiftir, ið høvdu við sær, at útflutningurin av ídnaðarfiski vaks.

Vøruútflutningurin í 2024 minkaði samanborið við árið fyri. Tað var serliga útflutningurin av ídnaðarfiski sum háladi útflutningsvirðið niður, ið millum annað var orsakað av, at útflutningurin av lýsi og fiskamjøli fullu ávikavist 500 mió. kr og 300 mió. kr. Í 2024 varð makrelurin aftur seldur sum makrelur til matna, og ikki landaður til ídnaðarvirkir sum í 2023. Harumframt var makrelprísurin hægri enn undanfarin ár, tí tað var møguligt at fiska

ein part av kvotuni í bretskum sjóøki, tá ið góðskan á makrelinum er best, og togaði hetta sostatt útflutningsvirðið av makreli upp. Tøkunøgdin av laksi vaks í 2024, og tað togaði útflutningin upp, umframt at høgir toska- og hýsuprísir somuleiðis góvu positivt íkast til útflutningsvirðið.

**Mynd 4.4: Vakstrarískoyti og árlig broyting vøruútflutningur, 2020-2023**




Viðm.: Ídnaðarfiskur er, fiskamjøl, fóður, lýsi og onnur nýtsla ikki mannaføði
Kelda: Hagstova Føroyar og egnar útrokningar

05

# Almenna fíggjarstøðan og útlit

**Úrslitið á almennu roknskapunum vísir hall í 2025 og 2026**

Mynd 5.1 vísir roknskaparúrslitið hjá landskassanum (RLÚ I) fram til 2023. Í úrslitinum er atlit tikið at, at partar av tilfeingis- og rentuinntøkunum skula í Búskapargrunnin, hetta soleiðis at tilber at samanbera úrslitini við 2024 og frameftir. Frá 2024 og frameftir er roknskaparuppstillingin broytt. Roknskapurin fyri 2024 er ikki liðugur bókaður enn, men úrslitið á myndini vísir úrslitið við bókingum fram til og við 21. februar 2025 og metingum saman við Fíggjarmálaráðnum, um hvat manglar at vera bókað.

Úrslitið á fíggjarlógini er mett at verða eitt hall á 300 mió. kr. í 2025 og enn eitt hall á 265 mió. kr. í 2026. Hetta svarar til áleið 1% av BTÚ ár undan ár, sum ikki eigur at koma fyri í einum samfelagi uttan nakað nevnivert arbeiðsloysi.

**Mynd 5.1: Landskassaúrslitið RLÚ I, vanligir postar 2020-2026 (vinstumegin) og tilfeingisinntøkur sum skulu í búskapargrunn (høgrumegin)**




Viðm.: 2020-2023 er roknskapur, 2024 til 2026 eru metingar. 2026 er í føstum prísum.
Kelda: Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

Hall var í 2020, ið serliga var orsakað av Covid-19. Yvirskot var í 2021 og 2022, men síðani hevur hall verið á landskassans roknskapi og væntað verður, at hall eisini verður í 2025 og 2026. Hallið var serliga stórt í 2023, sum var orsakað av einum vøkstri í rakstrar- og íløguútreiðslunum á ávikavist nærum 300 og 200 mió. kr., meðan rakstrar- og íløguinntøkurnar bert vuksu við góðum 50 mió. kr. tilsamans. Vøksturin í rakstrarútreiðslunum sæst serliga í lønunum (150 mió. kr.) og í keyp av vørum og tænastum (100 mió. kr.). Vøksturin í íløgunum sæst serliga í postinum vegir, tunlar, havnir o.a. (120 mió. kr.). Harafturat eru inntøkurnar frá tilfeingisgjøldum frá ali- og fiskivinnuni

tilsamans góðar 700 mió. kr. í 2023 og harav skal ein javningarupphædd á góðar 180 mió. kr. flytast í Búskapargrunnin. Í 2022 var upphæddin, sum skuldi í Búskapargrunnin eisini stór (180 mió. kr.), men tá var eitt yvirskot frá rakstrinum á 195 mió. kr.
Í 2024 var eisini hall, men væl minni enn í 2023, og er tað serliga tí samlaðu íløgurnar minka við um sløkum 170 mió. kr. Á inntøkusíðuni er upphæddin, sum skal í Búskapargrunnin at verða javnað, lækkað við 200 mió. kr., 100 mió. kr. frá fiskivinnuni og 100 mió. kr. frá alivinnuni. Tað ger, at nettoupphæddin, sum skal í búskapargrunnin fer frá -127 mió. kr. til +45 mió. kr. 2024 er tí eisini tað fyrsta árið, har janvingarinntøkurnar, sum koma inn á fíggjarlógina frá Búskapargrunninum eru hægri enn javningarútreiðslurnar, sum skulu í Búskapargrunninum.

Fíggjarlógin fyri 2025 er grundarlagið fyri úrslitinum fyri 2025. Umframt metta hallið á 120 mió. kr. eru lagdar 135 mió. kr. í støðlingum. Støðlingar eru íløgur, sum verða fluttar fram frá undanfarnu árum. Samlaðu støðlingarnar frá undanfarnu árum til 2025 eru sambært Fíggjarmálaráðnum um 270 mió. kr. og metingin er, at ein helvt verður brúkt av hesum í 2025, ella 135 mió. kr. Umframt støðlingarnar metir Fíggjármálaráðið eisini eykajáttanir á 50 mió. kr. í 2025. Tað gevur eitt samlað hall á góðar 300 mió. kr. í 2025 og 265 mió. kr. Í 2026. Metingin fyri 2026 er grundað á úrslitið í ætlanini hjá landsstýrinum, sum liggur inni í roknskaparskipanini hjá landinum, umframt meting um at 100 mió. kr. verða brúkar afturat av støðlingunum. 2026 er í føstum prísum samanborið við 2025, tað vil siga, at tað ikki er javnað við lønar- og prísvøkstri.

### Eisini kommunurnar hava hall

Talvan niðanfyri vísir roknskapin fyri 2020 til 2023, og mett úrslit fyri 2024 og 2025. Hetta er fyri allar kommunur samlað. Talvan vísir hall øll vístu árini og tað veksur frá 2022 til 2024. Hallið er mett at vera eitt sindur minni í 2025, og er tað einamest orsakað av lægri íløgum.

**Talva 5.1: Samlað rakstrar- og játtanartøl fyri allar kommunurnar**
Mió. kr.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 2.690 | 2.714 | 2.923 | 3.112 | 3.315 | 3.307 |
| Rakstur | 2.147 | 2.207 | 2.318 | 2.494 | 2.681 | 2.768 |
| Løgur | 819 | 583 | 639 | 813 | 878 | 708 |
| **Úrslit** | **-277** | **-75** | **-34** | **-195** | **-244** | **-169** |

Kelda: Gjaldstovan. 2024: roknskapur per 26. februar, 2025: játtan

### Útreiðslurnar veksa skjótari enn inntøkurnar

Í januar 2024 gav Búskaparráðið út eina greining um fíggjarpolitiska haldførið, sum vísti at orsakað av demografisku broytingunum fara útreiðslurnar í framtíðini at renna frá inntøkunum, um ikki bygnaðarligar broytingar verða gjørdar. Tað er tí umráðandi at fáa tamarhald á útreiðslunum og at hyggja nærri at inntøkunum og gera tiltøk fyri at økja um

tær. Tað er neyðugt, at politisku myndugleikarnar fremja stórar bygnaðarligar broytingar. Verður tað ikki gjørt, er tað sannlíkt, at vælferðin, sum vit kenna hana í dag, er í vanda.

Demografisku broytingarnar hava við sær at tað verða alsamt fleiri eldri, samanborið við talið av fólki í arbeiðsførum aldri. Í dag eru nærum 1.000 fleiri pensjónistar (67+ ár) samanborið við í 2020 og sambært fólkatalsframskrivingini hjá Hagstovuni frá 2022, veksur talið av pensjónistum nógv komandi árini. Veksandi talið av pensjónistum leggur trýst á útreiðslurnar til pensjónir.

Talið av 80+ ára gomlum er somuleiðis vaksandi. Í 2020 vóru gott 2.270 fólk sum vóru 80+ ára gomul, í 2030 verða tað væntandi um 3.500, og í 2040 áleið 4.500 fólk í hesum aldursbólkum. Frá 2020 til 2040 er tað ein øking á 2.230. Frá 2020 til 2025 byrjar talið av 80+ ára gomlum at vaksa skjótari enn áður; metta tilgongdin í hesum tíðarskeiðinum er 500 fólk, og komandi árini byrjar talið av 85+ og 90+ ára gomlum eisini at veksa munandi, sí mynd 5.2. Alt annað líka kann væntast, at vøksturin í talinum av eldri borgarum fer at merkjast á røktartørvinum komandi árini.

**Mynd 5.2: Tal av 80+, 85+ og 90+ ára gomlum (til vinstru). Tilgongd av 80+, 85+ og 90+ ára gomlum (til høgru)**




Kelda Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Eldrarøktin liggur hjá kommununum, og kommunurnar fara helst í komandi tíðum at merkja eitt stórt trýst á útreiðslurnar til eldrarøktina. Um 20% av teimum sum í dag eru 80+ ára gomul eru fastbúgvandi á røktar-og ellisheimi. Verður hetta lutfallið nýtt, er tørvurin á búplássum til fastbúgvandi umleið 450 pláss afturat í komandi tíðum. Í dag eru umleið 630 tøk búpláss til fastbúgvandi og umlætting[8].

Demografiska gongdin kann eisini leggja trýst á útreiðslurnar á heilsuøkinum. Sum tað var víst á í greiningini um fíggjarpolitiska haldføri frá 2024, eru tey eldru oftari í samband við

heilsuøkið. Eitt økt tal av eldri borgarum vil tískil alt annað líka merkja størri trýst á heilsuverkið, tað vil siga, hægri útreiðslur.

Avleiðingin av demografisku gongdini er, at um einki verður gjørt, fara almennu útreiðslurnar at veksa skjótari enn inntøkurnar um bygnaðarligar broytingar ikki verða framdar. Tað sæst longu nú. Longu nú er hall á fíggjarlógini. Bæði í 2023 og 2024 var hall, og eisini verður væntað við einum halli í 2025 og 2026. Hall á fíggjarlógini merkir, at skuldin hjá landinum fer at veksa komandi árini. Tað ber við sær hægri rentuútreiðslur, sum merkir, at ein størri partur av av skattainntøkunum, skulu brúkast til at rinda rentur við.

### Fleiri nýskipanir mugu setast í verk fyri at fáa fíggjarpolitikkin haldføran

Landsstýrið hevur havt eitt uppskot til hoyringar um at hækka pensjónsaldurin upp í 70 ár frá 2035 til 2042. Um uppskotið verður samtykt bøtir tað væl um fíggjarpolitiska haldførið. Men fleiri tiltøk og nýskipanir mugu setast í verk fyri at koma á mál við at gera fíggjarpolitikkin haldføran. Á fleiri økjum ber til at umskipa raksturin soleiðis, at hann verður meira effektivur.

Til dømis eru kommunurnar 29 í tali í Føroyum, við einum fólkatalið á 54.000. Til samanberingar, hevur Grønland, sum hevur á leið sama fólkatal sum Føroyar, 5 kommunur. Danmark hevur 98 kommunur, har miðal íbúgvaratalið er 55.000. Bæði eldra- og dagstovnaøkið, sum eru stór og krevjandi økir, liggja hjá kommununum. Kommunurnar eru sera ymiskar, bæði í støðd, aldursamanseting av íbúgvunum og inntøkugrundarlagi. Neyðugt er hjá politiska myndugleikanum at endurskoða skipanina millum land og kommunur, tí allar kommunur fara helst ikki at megna trýstið á vælferðartænasturnar. Skilagott hevði verið at lækka talið á kommunum, soleiðis at umsitingin í hvørjari kommunu verður sterkari og fíggjarliga rásarúmið til at taka sær av dagstovna- og eldraøkinum batnar. Annar møguleiki er at endurskoða, um dagstovnaøkið og/ella eldraøkið eigur at liggja hjá kommunum. Neyðugt er undir øllum umstøðum at endurskoða fíggingina hjá kommununum.

Í Føroyum eru nógvir smáir stovnar. Føroyar hevur 39 fólkaskúlar, har nærum ein helvt, 15 skúlar, hava færri enn 40 næmingar. Nógvir smáir stovnar eru í almannaverkinum, heili 11 stovnar við 1-2 búfólkum og 38 stovnar við færri enn 10 búfólkum. Tað er bara ein stovnur undir almannaverkinum sum hevur fleiri enn 30 búfólk. Á eldraøkinum, eru tilsamans 30 stovnar. 18 av hesum stovnum hava færri enn 20 búfólk. Smáir stovnar gera tað væl truplari at hava skynsaman rakstur á stovnunum og harafturat krevja smáir stovnar eitt hægri starvsfólkatal fyri hvørt búfólk samanborið við, um stovnarnir vóru størri. Hetta er serliga galdandi, tá ið stovnarnir hava tørv á samdøgursmanning. Longu í dag eru avbjóðingar at manna øll størv á eldra- og almennaøkinum.

Ítøkiliga átti Landsstýrið eisini at sett eina nevnd at komi við ítøkliligum rationaliseringsætlanum innan øll tey trý stóru vælferðarøkini: almannaverk, útbúgvingarverk og heilsuverk. Eindarkostnaðirnir mugu lækkast, annars fara samlaðu

útreiðslurnar bara at veksa uttan íhald næstu mongu árini. Til tess krevjast umfatandi nýskipanir á øllum økjum.

Búskaparráðið hevur í sínum frágreiðingum fleiri ferðir víst á skipanir, sum eiga at endurskoðast ella strikast, fyri at gera samfelagsbúskapin betri. Neyðugt er at endurskoða heimaflotan. Í Várfrágreiðingini síni frá 2022 vísti Búskaparráðið á, at heimaflotin var komin til eitt markamót, og neyðugt er at gera eina haldgóða ætlan fyri, hvussu heimaflotin gerst burðardyggur, soleiðis at hann gevur eitt íkast til samfelagsbúskapin. Saman við hesum hongur eisini makrelstuðulin til heimaflotan. Heldur enn at gera neyðuga tillaging/nýskipan í heimaflotanum, er politiska skipanin farin inn aftur á gamlar slóðir, við at veita stuðul til heimaflotan, í hesum føri sum makrelkvotur. Hetta hóast heimaflotin ikki kann fiska pelagiskan fisk.

Búskaparráðið hevur áður víst á ymiskar aðrar skipanir, sum ikki eru góðar fyri búskapin, eitt nú sjómannafrádrátturin. Heldur ikki Fiskavirkisskipanin, sí frágreiðing frá ráðnum á heysti 2024, er skilagóð fyri búskapin eins og minstaløn til heimaflotan heldur ikki er tað. Hesar báðar seinast nevndu skipanir eru ikki fíggjaðar av landskassanum, men skipanirnar eru lógarbundnar og forða fyri neyðugu tillagingum í ávikavist fiskatilvirking og heimaflotanum.

Landsstýrið hevur samtykt at lækka uttanlandsfrádráttin og eisini gjørt broytingar í ferðastuðlinum og stuðul til dubult húsarhald. Harafturat verður pensjónsútgjaldið til pensjónin fyri samlivandi frameftir tað sama sum pensjónin til pensjónistar, sum eru giftir. Hetta eru stig rætta vegin, tó mugu nýskipanir framvegis gerast.

Tað er sjálvsagt ikki nøkur løtt uppgáva at fáa betur rakstur í tað almenna. Men taka politisku myndugleikarnir ikki neyðugu avgerðirnar fyri at reka samfelagið skilabetri, vera tað í síðsta enda kreditorarnir sum gera tað, júst sum í kreppuni fyrst í nítiárunum.

### Íløgurnar mugu raðfestat

Politikararnir hava nógvar ætlanir um íløgur, sum í sjálvum sær kunnu vera góðar. Men neyðugt er at hava við í hesum, at tilfeingið ikki er ótømandi. Meginparturin av almennu íløgunum verða fíggjaðar við inntøku- og avgjaldsskatti frá borgarunum. Inntøkuskatturin og inntøkur av meirvirðisavgjaldið var um 60% av inntøkunum hjá landskassanum í 2023. Fyri kommunurnar er inntøkuskatturin eisini høvuðsparturin av inntøkunum.

Fíggjarmálaráðið gjørdi eitt yvirlit yvir almennar íløgur í síni frágreiðing til játtanarkarmar 2024. Uppgerðin er frá 2023, so hon kann vera broytt, men talan er um íløgur fyri 32 mia. kr. tilsamans. Um 6 mia. kr. av hesum standa til at verða fíggjaðar av brúkaragjøldum (SEV, Føroya Tele), men neyðugt er at hugsa, at tað eru somu skattgjaldarar, sum skulu rinda allar íløgurnar. Givið er, at tað er neyðugt at raðfesta ímillum hesar íløgur; Føroyar hava ikki ráð at gera allar. Ein háttur at hyggja at, hvussu nógv afturat, Føroyar kunnu brúka til íløgur er at hyggja at almennu bruttoskuldini.

### Talva 5.2: Íløgutørvur hjá almenna geiranum næstu fimtan árini

| Kostnaðarmeting<br>í mió. kr. | |
|---|---|
| Samferðsluætlan, harímillum Suðuroyartunnilin | 10.200 |
| Útbygging av sjúkrahúsverkinum | 1.000 |
| Tørvurin á vardum bústøðum (lutvís brúkarafíggjað) * | 250 |
| Endurnýggjan av ferjunum hjá SSL | 400 |
| Talgilding av almennum tænastum | 300 |
| Grøn umlegging av verandi almennum bygningum | 100 |
| Nýtt vaktar- og bjargingar skip | 400 |
| Útbygging og dagføring av Vága Floghavn (lutvís brúkarafíggjað) | 500 |
| Viðlíkahaldstørvur (vegir, tunlar, brýr, bygningar, skip og KT-skipanir) | 1.600 |
| Eldraíbúðir (lutvís kommunal og lutvís brúkarafíggjað) ** | 500 |
| Tjóðleikhús (lutvís grunnafíggjað) *** | 200 |
| Universitetskampus | 1.200 |
| Bygningar innan savnsøkið | 100 |
| Stuðulsveitingar til bygging | 100 |
| **Tilsamans** | **16.900** |
| | |
| **Íløgur sum ikki nýta at ávirka lánførið hjá landinum (brúkarafíggjað)** | |
| Grøna orkuskiftið (elframleiðsla, SEV) | 4.000 |
| Íløgur í talgilda undirstøðukervið (5G, net, fipur, nýggjur sjókaðal) | 1.000 |
| Bygging av almennum leigubústøðum (Bústaðir) | 500 |
| Dagføringar av undirsjóvartunlum | 300 |
| Útbyggingar av fjarhitanetinum | 500 |
| **Tilsamans** | **6.300** |
| Leysliga mettur kommunalur íløgutørvur | 9.000 |
| **Íløgur tilsaman** | **32.200** |
| Mett BTÚ í 2023 (mió. kr.) | 26.000 |
| **Mettur almennur íløgutørvur í % av BTÚ í 2023** | **125-130%** |

Viðm.: Tølini eru avrundað. * Mett verður, at bygdir verða vardir bústaðir fyri 500 mió. kr. og at helvtin er brúkarafíggjað. ** Mett verður, at bygdir verða eldraíbúðir fyri 1.000 mió. kr. og at helvtin er brúkarafíggjað. *** Tjóðleikhúsið er mett at kosta í minsta lagi um 300 mió. kr., og landsins partur er leysliga mettur til tveir triðingar.
Kelda: Fíggjarmálaráðið, Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2024, 31. mars 2024.

### Ovara markið fyri almenna bruttoskuld er 60%

EGS skuld er ein felags standardur, sum EU londini nýta til at gera upp almennu bruttoskuldina. EGS stendur fyri Evropeiska Gjaldoyrasamstarvið, og skuldin verður ofta nevnd ØMU-skundin eftir danska navninum (den Økonomisk Monetære Union). EGS skuldin fevnir um landið, kommunurnar og grunnar. Skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar verður roknað uppí skuldina hjá landskassanum. Grundin er, at eftir altjóða leisti fyri hagtalsuppgerð av skuld hjá fyritøkum undir almennum ræði, er veðhaldsskylda roknað uppí hjá feløgum, sum ikki eru sjálvberandi.

**Mynd 5.3: EGS-skuld 2017-2025**




Kelda: Landsbanki Føroya, Gjaldstovan, ALS, AMEG, Eystur- og Sandoyartunlar og Hagstova Føroya, Búskaparráðið
Viðm. BTÚ er uppgjørt frá 2017 til 2023, 2024 og 2025 er meting hjá Búskaparráðnum. EGS-skuldin í 2024 og 2025 er meting hjá Landsbanka Føroya.

Mynd 5.3 vísir, at EGS skuldin fall frá 2017 til 2019, eitt nú varð lán frá danska statinum á 500 mió. kr. niðurskrivað í 2018. Í mai 2020 tók Landskassin lán á 1.600 mió. kr. í sambandi við Covid-19, men longu aftur í juni 2021 varð 1.350 mió. kr. av skuldini afturrindað. Í 2021 og 2022 minkar EGS-skuldin, men veksur við áleið 500 mió. kr. í 2023. EGS skuldin var í 2023 29% av BTÚ, sum er eitt vet minni, enn EGS skuldin hjá Svøríki og Danmark, hvørs bruttoskuld í 2023 varð ávikavist 31,5% og 33,6% av BTÚ, og sum samstundis eru nøkur av teimum londunum í EU sum hava lægst EGS skuld, sí myndina niðanfyri.

**Mynd 5.4: Almenn bruttoskuld í ymsum londum 2023, EGS skuld í % av BTÚ**

Almenn fyrisiting og tænastur, t. e. uttan almennar fyritøkur




Keldur: Landsbanki Føroya (Føroyar), tradingeconomics.com (Ísland og Noreg) og Eurostat.

Við ársenda 2025 verður EGS-skuldin í Føroyum mett at vera góð 30% av BTÚ. Sambært ES reglum, skal skuldin ikki vera meira enn 60% av BTÚ. Við at halda skuldina undir 60%, er tað meira sannlíkt, at landið kann halda fíggjarligum støðufesti og hava ráð til at rinda skuldina aftur uttan ov stórar avbjóðingar. Um skuldin er ov høg, kann tað gera tað truplari fyri eitt land at rinda skuldina aftur, serliga um tað kemur í fíggjarligar trupulleikar.

Sum mynd 5.4 vísir, eru fleiri av størru búskapunum, har landsmyndugleikarnir hava eina skuld, sum er langt omanfyri markið á 60%. Markið á 60% verður stundum kjakast um, um tað er tað rætta markið, ella um tað skal liggja hægri. Fyri ein pinkubúskap, sum tann føroyska við sera einstáttaðum vinnubygnaði í útflutninginum talar varsemi fyri einum lágum skuldarmarki.

Útgangsstøðið í Føroyum við einari EGS skuld á 30% av BTÚ er gott. EGS skuldin í tølum er um 8,8 mia. Um skuldin var 60% av BTÚ, so svarar tað til eina skuld á 17,4 mia. kr. Tað vil siga, at skuldin helst ikki skal veksa við meira enn 8,6 mia. kr. (2025 tøl). Til dømis eru ætlanir um at gera ein Suðuroyartunnil. Sambært P/F Suðuroyartunnil fer tunnilin at kosta

4 mia. kr. (í føstum prísum) og við rentum umleið 5 mia. kr at byggja. Tá ein íløga verður somikið stór, er eyðsæð, at rásarúmið til at gera aðrar íløgur, sum eitt nú kundu bøtt um haldførisavbjóðingina, verður minni. Harafturat skulu undirskotini á fíggjarlógini hjá landi og kommunum eisini fíggjast komandi árini.

### Føroyingar eiga at fáa sum mest fyri hvørja íløgukrónu

Fyri at tryggja eina burðadygga samfelagsmenning má javnvág vera millum nútíð og framtíð, har íløgur gagna komandi ættarliðum uttan at skapa eina overstóra fíggjarliga byrðu. Tí er neyðugt at raðfesta rætt millum samfelagsligar tænastur sum búspláss á ellisheimum, undirstøðurkervi sum tunlar, útbúgvingarskipan, KT-verkætlanir og annað. Er endamálið við íløgunum at betra um fíggjarpolitiska haldførið, noyðast tær íløgurnar, sum fara at lætta um almennu rakstrarbyrðuna í longdini, at hava hægstu raðfesting. Hetta kann eitt nú gerast við at byggja størri eindir á skúla-, almanna og eldraøkinum.

Tá størri íløgur skulu gerast í undirstøðukervið, eigur ein partur av fyrireikingini verið at gera kost-nyttu greiningar. Kost-nyttu greinginar eiga at vera gjørdar av øllum stórum íløgum í undirstødukervi, sum eru í umbúna. Tað tryggjar at skattaborgarin veit, um hesar íløgur geva samfelgsnyttu ella ei, og um onnur alternativ farleið ella slag av undirstøðukervi hevði givið størri samfelagsliga nyttu. Kost-nyttu greining eigur at verið framd av teimum stóru verkætlanunm sum liggja fyri framman, eitt nú Tjørnuvíkartunlinum og Vestmannatunlinum.

### Landið eigur at taka rætta tilfeingisgjaldið inn

Tað er ikki bert á útreiðslusíðuni, at til ber at betra um fíggjarpoltiska haldførið, eisini er møguligt at hygga at inntøkusíðuni, eitt nú at tilfeingisgjøldunum. Búskaparráðið er av tí áskoðan, at landið eigur at taka inn rætta tilfeingsgjaldið, bæði frá alivinnuni og fiskivinnuni. Eisini eigur at vera hugt at skattaálitinum frá 2017, har fleiri góð hugskot eru um, hvussu inntøkugrundarlagið kann víðkast.

### Fíggjarpolitiskt regulverk má setast í verk

Politisku mynduleikarnir eiga at seta eitt fíggjarpolitiskt regulverk í verk. Endamálið við einum fíggjarpolitiskum regluverki er, at tryggja ein skilagóðan og haldføran fíggjarpolitikk. Fíggjarpolitiska regluverkið er eitt amboð til at fáa tamarhald á útreiðsluvøkstrinum. Politiska skipanin eigur í eini breiðari semju, at seta sær mál fyri úrslitið hjá tí almenna 5 til 10 ár fram í tíð, ið er í samsvar við ein haldføran búskap í langa høpinum. Umráðandi er at fíggjarpolitiska regulverkið fevnir bæði um land og kommunur.

# 06
# Arbeiðsmarknaðurin

Gongdin í fólkatalinum og av fólki á arbeiðsmarknaðinum hevur verið vaksandi seinastu 10 árini og tað sæst aftur í framgongdini í búskapinum. Starvsfólkatalið liggur á hægsta stigi nakrantíð og samlaðu lønargjaldingarnar settu eisini met í 2024.

Áleið 30.000 starvsfólk vóru skrásett í november 2024, sum er ein vøkstur á 0,7% samanborið við 2023. Gott og væl 18.000 starvsfólk arbeiða í vinnuni og upp í móti 12.000 fólk arbeiða hjá tí almenna, sí talvu 6.1[9] Vinnan fevnir um alt marknaðarligt virksemi og fevnir um feløg, húsarhald, sjálvstøðug vinnurekandi, felagsskapir og almenn partafeløg. Tað almenna fevnir um tað sum ikki er marknaðarligt virksemi, eitt nú heilsuverkið, dagstovnaøkið, eldraøkið.

**Talva 6.1: Starvsfólk skift á høvuðsgeirar**

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tils. (geiri) | 28.383 | 28.839 | 29.490 | 29.564 | 29.747 |
| Vinnan | 17.533 | 17.903 | 18.122 | 18.206 | 18.023 |
| Tað almenna | 10.721 | 10.837 | 11.295 | 11.290 | 11.665 |
| Umheimurin og ógreinað | 129 | 99 | 73 | 68 | 59 |

Viðm.: Vinnan fevnir um feløg, húsarhald og felagsskapir (S11, S12, S14, S15). Tað almenna fevnir um almenn fyrisiting og tænasta (S13)
Kelda: Hagstova Føroya, høvuðsstarv, árstíðarjavnað, tøl fyri november á hvørjum ári.

Verður arbeiðsmarknaðurin býttur í 2 høvuðsbólkar hava 61% av starvsfólkunum sítt høvuðsstarv í vinnuni og 39% hjá tí almenna. Lutfallið hevur ligið støðugt síðstu 10 árini, sí mynd 6.2.

Miðalvøksturin seinastu 30 árini skift á høvuðsbólkarnar hevur verið 1,6% í vinnuni og 1,9% hjá tí almenna, sí mynd 6.3 niðanfyri. Stór sveiggj eru í vøkstrinum frá einum ári til annað og tølini sveiggja meira í vinnuni enn hjá tí almenna. Tað vísir seg, at tá vinnan hevur stóran starvsfólkavøkstur, fylgir tað almenna við eitt sindur seinkað og tað sama er galdandi, tá ið starvsfólkatalið lækkar; tá er tað almenna eitt sindur seinni við eini slíkari tillaging.

Síðani 2021 hevur starvsfólkavøksturin í vinnuni verið støðugt avtakandi og í 2024 lækkaði starvsfólkahópurin 1%. Tað sama kann ikki sigast um tað almenna, har eingin vøkstur millun annað var í 2023, men hinvegin ein vøkstur á góð 3% í 2024.

**Mynd 6.2: Starvsfólk í vinnuni og tí almenna 2015-2024**
**% býti**




Viðm.: Árstíðarjavnað. Almenn fyrisiting (S13), Feløg, húsarhald og felagsskapin (S11, S12, S14, S15)
Kelda: Hagstova Føroya

**Mynd 6.3: Árligur starvsfólkavøkstur og miðal vøkstur seinastu 30 árini**




Kelda: Hagstova Føroya

Yvirskipað hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar í báðum høvuðsbólkum, sí talvu 6.2 niðanfyri.

**Talva 6.2: Lønargjaldingar í samlaða búskapinum**

| Mia. kr. | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vinnan | 6,7 | 6,9 | 7,4 | 7,8 | 8,1 |
| Tað almenna | 3,7 | 3,9 | 4,1 | 4,3 | 4,7 |
| Samlaði búskapurin | 10,4 | 10,8 | 11,5 | 12,1 | 12,7 |
| Árligur lønarvøkstur í samlaða búskapinum í prosentum | 2% | 4% | 6% | 6% | 5% |

Viðm.: máldar lønargjaldingar á hvørjum árið, januar til desember á hvørjum ári.
Kelda: Hagstova Føroya.

Mynd 6.4 niðanfyri býtir arbeiðsmarknaðin sundur í undirgeirar, og tá sæst, at áleið 16.000 fólk hava sítt høvuðsstarv á privata arbeiðsmarknaðinum undir privatum ræði, 1.300 í almennum partafeløgum og eini 6.000 í landsfyrisiting og tænastu, umframt 5.400 í kommunufyrisiting og tænastu.

**Mynd 6.4: Tal av starvsfólkum í undirgeirunum (Høvuðsstarv, nov. 2024)**




Viðm.: Høvuðsstørv í innlendska búskapinum. Privatar fyritøkur v.m. er Feløg, húsarhald og felagsskapin (S11, S12. S14 pg S15), ið eru undir ávikavist privatum, almennum ella útlendskum ræði. Somuleiðis innan almenna fyrisiting og tænastu (S13) verður sipað til landsfyrisiting og tænastu, kommunufyrisiting og tænastu, ríkisfyrisiting og tænastu og sosialir trygdargrunnar.
Kelda: Hagstova Føroya.

Tað merkir, at flest fólk arbeiða í privatu vinnuni, síðani fyri landi og kommunurnar. Gongdin í ymisku undirgeirunum er víst í talvu 6.3 niðanfyri. Starvsfólkatalið í privatu fyritøkunum v.m., har 16.000 fólk starvast, gongur aftur við 1,3%. Hóast vøksturin í starvsfólkatalinum minkaðir síðstu 3 árini, er 2024 fyrsta árið síðan 2013 at starvsfólkatalið í privatu fyritøkunum fellur. Tey sum hava sítt høvuðsstarv í einum almennum partafelagi eru blivin 5% fleiri. Her skal eisini havast í huga, at tað eru 1.300 starvsfólk í almennu partafeløgunum, og tí er broytingin í talið ikki líka stór sum afturgongdin á 1,3% í privatu fyritøkunum. Tað sæst eisini í talvu 6.3 at starvsfólkini í tí almenna eru blivin fleiri tað seinasta ári, hjá landinum eru 4,5% fleiri og 2,3% hjá kommununum.

**Talva 6.3 Gongdin í starvsfólkahøvuðsbólkunum, prosentbroyting ár um ár**

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Undir almennum ræði (almenn partafeløg) | -0,9% | 3,5% | 5,5% | 1,2% | 5,0% |
| Undir privatum ræði | 0,5% | 2,2% | 1,1% | 0,9% | -1,3% |
| Landsfyrisiting og tænasta | 2,1% | 2,5% | 1,0% | 0,0% | 4,5% |
| Kommunufyrisiting og tænasta | 2,0% | -0,6% | 8,2% | -0,1% | 2,3% |
| Samlaði búskapurin | 0,9% | 1,7% | 2,4% | 0,3% | 0,7% |

Viðm.: Feløg undir útlendskum ræði, ríkisfyrisiting og sosialir trygdargrunnar eru tiknir úr talvuni fyri at halda hana einfalda.
Kelda: Hagstova Føroya

**Talva 6.4: Lønargjaldingar 2020-2024 í tíðandi undirgeirum**

| Mió. kr. | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Undir almennum ræði (almenn partafeløg) | 468 | 479 | 522 | 560 | 611 |
| Undir privatum ræði | 5.696 | 5.900 | 6.330 | 6.769 | 6.923 |
| Landsfyrisiting og tænasta | 2.214 | 2.345 | 2.442 | 2.555 | 2.781 |
| Kommunufyrisiting og tænasta | 1.378 | 1.446 | 1.505 | 1.575 | 1.735 |
| Innlendski búskapurin | 10.416 | 10.806 | 11.465 | 12.126 | 12.731 |
| Prosentvísur vøkstur ár um ár | | | | | |
| Undir almennum ræði | -1% | 2% | 9% | 7% | 9% |
| Undir privatum ræði | 0% | 4% | 7% | 7% | 2% |
| Landsfyrisiting og tænasta | 5% | 6% | 4% | 5% | 9% |
| Kommunufyrisiting og tænasta | 4% | 5% | 4% | 5% | 10% |
| Samlaði búskapurin | 2% | 4% | 6% | 6% | 5% |

Viðm.: máldar lønargjaldingar á hvørjum árið, januar til desember á hvørjum ári. 163 mió. kr vóru útgoldnar í lønum til Ríkisfyrisitingin og sosisialir trygdargrunnar (1,3% av samlaðu lønargjaldingunum).
Kelda: Hagstova Føroya.

Talva 6.4 vísur lønargjaldingarnar fyri árini 2020-2024 og gongdina í prosentum. Lønargjaldingarnar í 2024 settu met og vuksu 5% samla sæð fyri allan búskapin. Hetta skal samanberast við, at samlaða starvsfólkatalið vaks 0,7%. Tí kann meginparturin av vøkstrinum í lønargjaldingunum skyldast lønarhækkingum og lønarlyfti og ikki framgongdini í starvsfólkatalinum.

Hóast samlaða starvsfólkatalið í tí almenna ikki vaks frá 2022 til 2023, so hækkaðu ársverkini hjá landinum sambært Gjaldstovu Føroya ávikavist við 2% í 2022, 1,7% í 2023 og 1,6% í 2024. Gongdin í ársverkum hjá landinum samsvarar betur við gongdina í lønarútgjaldinum, samanborið við, at tað var ein stígur í 2023 og vaks so aftur í 2024. Hetta kann skyldast, at fólk hava tikið eyka vaktir fyri at fáa endarnar at røkka saman, sum Heystfrágreiðingin eisini var inni á. Tá v+isti Kommunufelagið á at fleiri tóku eyka vaktir og stóra trotið á arbeiðsmegivar minkað. Samlaðu lønargjaldingarnar í tí almenna hækkaðu á leið 5% á hvørjum árið í 2021, 2022 og 2023 og heili 9% í 2024. Í 2024 løgdust fleiri starvsfólk aftrat og nógvir stórir fakbólkar, sum arbeiða í tí almenna, fingu bæði lønarlyft og lønarhækkan.

Starvsfólkini í Føroyum, eins og í mongum øðrum framkomnum londum, hava við tíðini flutt seg úr tilfeingis- og framleiðsluvinnum yvir í tænastuvinnur, sí mynd 6.5. Tænastuvinnan innber alt frá flutningsfyritøkum, ferðavinnuni, matstovuvirksemi og eisini almennu vælferðartænasturnar; eitt nú heilsuverk, eldrarøkt og barnaansing.

**Mynd 6.5: Starvsfólk býtt á vinnugreinabólkar, % av samlaðu, 1985 – 2024**




Viðm.: Starvsfólkatalið er víst fyri desember mánað í hvørjum ári.
Kelda: Hagstova Føroya.

## Gongdin í vinnuni

Tær størstu vinnugreinarnar í vinnuni eru vístar í lagkøkuni niðanfyri. Tað eru serliga fýra stórar høvuðsvinnugreinar; hesar eru:

- Heil- og smásøla (t.d. handlar og heilsølur)
- Framleiðsluvinna (virking av fiski og laksi),
- Byggivinnan
- Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða (fiskiveiðu og aling)

**Mynd 6.6: Starvsfólk býtt á høvuðsvinnugreinar, nov. 2024**




Viðm.: Aðrar smærri vinnugreinar fevna um Serkøn, vísindalig og tøknilig tænastuveiting, Fígging og trygging, Umsitingarligar o.l. tænastuveitingar, Kunning og samskifti, List, undirhald og ítróttir, Aðrar tænastuveitingar, Heilsu- og almannaverk, Undirvísing, Søla, útleiga og umsiting av fastognum, El-, gass- og fjarhitaveiting, Vatnveiting; kloakkir og ruskviðgerð, Virksemi hjá altjóða felagskapum og Námsvinna og grótbrot. Kelda: Hagstova Føroya.

Ymisk er, hvussu gongdin hevur verið innan høvuðsvinnugreinarnar seinastu árini. Talið av starvsfólkum er vaksið í øllum vinnugreinum seinastu 10 árini. Starvsfólkatalið í framleiðsluvinnuni hevur verði fallandi síðani 2021, sí mynd 6.7.

Aðrar vinnugreinar hava havt eina støðuga framgongd seinastu árini og nógvar av teimum eru innan tænastuvinnuna, sum eisini hongur væl saman við rákinum í framkomnum londum, at tænastuvinnan fyllur meira og meira samanborið við tilfeingisvinnuna, sí mynd 6.5.

**Mynd 6.7: Starvsfólk skift á vinnugreinar undir privatum ræði**




Viðm.: Loypandi 12 mðr. miðal. Aðrar vinnugreinar eru tær somu, sum eru nevndar í myndini frammanundan við gisting og matstovuvinnu og Flutnings- og goymsluvinnuni lagt afturat. Almenn partafeløg eru ikki ein partur av tølunum, tí tað vísur einast undir privatum ræði.
Kelda: Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Starvsfólkatalið í heil- og smásøluvinnugreinini stendur í stað. Eisini innan fiskiveiði o.t. vísur sama mynstur seg, og tað er serliga innan fiskiveiði at starvsfólkatalið er lækkandi, tí innan aling er starvsfólkatalið støðugt vaksandi.

**Mynd 6.8: Gongdin á vinnuligum arbeiðsmarknaðinum undir privatum ræði**




Viðm.: Index 2015 við loypandi 12 mðr. miðal. Aðrar vinnugreinar eru tær somu, sum eru nevndar í myndini frammanundan við gisting og matstovuvinnu og Flutnings- og goymsluvinnuni lagt afturat. Almenn partafeløg eru ikki ein partur av tølunum, tí tað vísur einast undir privatum ræði.
Kelda: Hagstova Føroya.

Byggivinnan hevur havt størsta og mest støðuga vøksturin í nógv ár. Stórar íløguverkætlanir eru framdar seinastu árini og tað sæst aftur í starvsfólkahópinum í byggivinnuni. Byggivinna er ein konjunkturviðkvom vinnugrein og framgongdin í búskapinum seinastu 10 árini sæst aftur í starvsfólkatalinum í vinnuni. Hvussu útlitini eru í byggivinnan er viðgjørt meira í kap. 03.

Innan fiskiveiða o.a. (A) er tað serliga aling, ið dregur starvsfólkatalið upp. Í 2020 arbeiddu áleið 600 innan aling og í 2024 vóru 800 starvsfólk í vinnugreinini. Aftrat tí er uppsjóvarvinnan hækkað eitt vet, umframt botnfiskiveiða, har fiskur er virkaður umborð. Lítil og støðug afturgongd hevur verið í botnfiskiveiðuni, har eingin virking er umborð. Yvirskipað stendur starvsfólkatalið í tilfeingisvinnuni í stað, sjálvt um smáar broytingar eru í ymsu undir-vinnugreinunum.

Verður útgangsstøðið tikið í teimum seinastu trimum árunum, sæst, at starvsfólkatalið í framleiðsluvinnuni gongur aftur. Serliga er tað virking av fiski, ið fevnir m.a. um flakavirkini og uppsjóvarvirkini, har afturgongdin sæst, tí talið av starvsfólkum í tilvirking av vørum úr laksi liggur á sama støði í dag, sum tað var í 2020. Ein vøkstur var í árunum 2021-2023, men eitt lop niðureftir var í januar 2024. Talið er tó kvinkað spakuliga uppeftir síðani.

## Gongdin í almennari fyrisiting og tænastu

Í almennari fyrisiting og tænastu er eru fýra undirgeirar: Landsfyrisiting og tænasta, Kommunufyrisiting og tænastu, Sosialir trygdargrunnar og Ríkisfyrisiting og tænasta. Sirkulmyndin niðanfyri vísir, hvussu tey áleið 11.500 fólkini, ið starvast í almennari fyrisiting og tænastu, eru býtt á undirgeirar. 51% arbeiða hjá landinum og 47% hjá kommununum, restin starvast hjá ríkisfyrisitingini og sosialum trygdargrunnum (t.d. ALS).

**Mynd 6.9: Starvsfólk í almennari fyrisiting og tænastu**

Høvuðsstarv, november 2024




Kelda: Hagstova Føroya.

Starvsfólkahópurin í almennari fyrisiting og tænastu er vaksin seinastu 10 árini. Í trimum teimum størstu vinnugreinunum innan landsfyrisiting og tænastu (heilsu- og almannaverk, undirvísing og almenna umsiting v.m.) eru seinastu 10 árini løgd áleið 900 fólk løgd aftrat starvsfólkahópinum, og 750 av hesum (83%) arbeiða innan heilsu- og almannaverk og undirvísing. Ársverkini í miðfyrisitingini hjá landinum (tey í stjórnarráðunum) eru farin úr 136 til 144 frá 2021 til 2024. Tey telja fyri 2,8% av samlaðu ársverkunum hjá landinum.

Tað ber ikki til at siga nakað um, innan hvørji starvsøki fleiri starvsfólk eru løgd afturat innan kommunu fyrisitingini og tænastu, tí eingin almenn hagtøl eru tøk á økinum. Tí ber ikki til at greina við almennum tølum, hvørt starvsfólkavøksturin í kommununum er innan t.d. dagstovnaøkið ella eldraøkið, sum eru tvær tær størstu uppgávurnar hjá kommununum. Tað ber tó til at hyggja eftir nýtsluútreiðslunum til almannamál hjá kommunum, ið fevna mest um eldraøkið og dagstovnaøkið. Útreiðslurnar á eldraøkinum eru farnar úr góðum 400 mió. kr í 2015 til 650 mió. kr. í 2023 og útreiðslurnar til familju og børn, har bulurin er dagstovnaøkið, eru útreiðlsurnar somuleiðis farnar úr nærum 400 mió. kr. til 650 mió. kr. tað vil siga, ein hækking á 60%. 72% av nýtsluútreiðslunum fóru í 2023 til lønir og atknýtt gjøld. Samlaðu nýtsluútreiðslurnar hjá kommununum hækkaðu í sama tíðarskeiði úr 1,6 til 2,5 mia. kr., ið svarar til eina hækking á 50%. tað vil siga, at nýtsluútreiðslurnar hjá kommununum til almannamál fylla meira nú enn tær gjørdu í 2015.

Í Danmark fylgir talið av starvsfólkum í tí almenna við fólkavøkstrinum, men tá ið hugt verður eftir, hvussu nógvir tímar vera arbeiddir innan almenna geiran, er talið støðugt minkandi, sum merkir, at færri tímar verða arbeiddir á vælferðarøkinum samanborið við, hvussu nógv fólk eru í landinum. Tað er møguligt, at ein partur av tí kemst av, at summar almennar veitingar vera bjóðaðar út privat og summar tænastur vera veittar meira effektivt, men tølini eru tó so eyðsýnd, at tað kemst ikki frá, at vælferðartænasturnar fyri hvønn persón eru lækkaðar seinastu nógvu nógvu árini. Hetta ber við sær avbjóðingar orsakað av demografisku gongdini[10].

## Arbeiðsmarknaðardemografi

Aldurssamansetingin á arbeiðsmarknaðinum sæst á myndini niðanfyri. 45% av starvsfólkunum eru yngri 40 ár og 55% eru eldri enn 40 ár. Býtið var tað sama fyri 15 árum síðani.

**Mynd 6.10 Aldursbýtið á arbeiðsmarknaðinum**




Kelda: Hagstova Føroya

Yvirskipað er kynsbýtið javnt býtt millum starvsfólkini á arbeiðsmarknaðinum, 49% eru kvinnur og 51% eru menn. Kynsbýtið á høvuðsgeirabýtunum eru tó øðrvísi. Í vinnuni arbeiddu áleið 11.700 menn (66%) og 9.300 kvinnur (34%) í 2024. Í tí almenna arbeiddu 3.200 menn (28%) og 8.300 kvinnur (72%), sí mynd 6.11. Gongdin seinastu 15 árini fyri kynsbýtið vísir, at báðir høvuðsbólkar eru blivnir meira domineraðir av tí kyninum, sum frammanundan var í meirluta. Í 2010 vóru 62% av starvsfólkunum í vinnuni menn og 38% kvinnur og í tí almenna 31% og 69%. Tað merkir at fleiri menn vera settir á privata arbeiðsmarknaðinum samanborið við kvinnur og øvugt.

**Mynd 6.11 Kynsbýtið í vinnuni og almennari fyrisiting og tænastu**




Kelda: Hagstova Føroya

Tað hevur verið ein stór tilgongd av útlendskari arbeiðsmegi seinastu árini. Í 2009 vóru 3% av starvsfólkunum í samlaða búskapinum ikki føroyingar, í 2024 var parturin hækkaður til 8%, ið svarar til á leið 2.300 starvsfólk. Serliga síðani fast track skipanin kom í november 2021 hevur tilgongdin av útlendskari arbeiðsmegi verið stór, sí talvuna niðanfyri.

**Talva 6.5 Vøksturin í starvsfólkatalinum**

Árstíðarjavnað, nov. 2024

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|
| Samlaði búskapurin | 1,7% | 2,4% | 0,3% | 0,7% |
| Føroyingar | 1,2% | 1,0% | -0,5% | 0,5% |
| Útlendingar | 11,6% | 24,1% | 10,4% | 2,3% |

Kelda: Hagstova Føroya

Í 2022 var ein vøkstur í útlendskari arbeiðsmegi 24%, í 2023 var vøksturin 10 % og í 2024 2%. Tað er tí líkt til at tilgongdin av útlendskum starvfólkum er hæsað av. Talið av teimum sum søkja um uppihaldsloyvi av fyrstan sinni, við arbeiði sum endamál, fylgir somu gongd. Talið hækkaði úr 800 í 2020 til næstan 1.600 í 2022, men fækkaði aftur til umleið 1.000 í 2024. Tað skal viðmerkjast, at øll sum fáa uppihaldsloyvi, koma ikki til Føroyar at arbeiða. Talið av loyvum, ið vera givin skal tí ikki skiljast, sum samlaða talið av útlendingum, ið koma til Føroyar at arbeiða.

Myndin niðanfyri vísur í hvørjum vinnugreinum útlendingarnir arbeiða. Av samlaða talinum av útlendingum arbeiða 31% av teimum í framleiðsluvinnuni, sum serliga fevnir at virking av fiski á flakavirkjum og kryvjivirkum av laksi. 13% arbeiða í byggivinnuni og 12% arbeiða innan gisting og matstovuvinnuna.

**Mynd 6.12 Samlaðu útlendingarnir býttir á vinnugreinarnar**




Viðm.: nov. 2024. Aðrar vinnugreinar fevna um vinnugreinarnar í NACE 1 N, R, H, M, J, S, D, L, E, K, B, U
Kelda: Hagstova Føroyar

Mynd 6.13 vísir hvussu stórur partur av starvsfólkunum í vinnugreinunum eru útlendingar og vísir gongdina í teimum vinnugreinum, har flest útlendingar arbeiða. Tað eru flest útlendingar í framleiðsluvinnuni og av samlaðu starvsfólkunum í vinnugreinini er meira enn fimti hvør útlendingur. Í 2016 var tað minni enn tíggindi hvør. Í byggivinnuni starvast nógvir útlendingar í dag, umleið 13% av starvsfólkatalinum. Í 2016 vóru sløk 3% av starvsfólkunum í byggivinnuni útlendingar. Innan gisting og matstovuvinnu er umleið triðingurin av starvsfólkunum útlendingar, sum er ein stór hækking samborið við 2016, tá ið 8% av starvsfólkunum vóru útlendingar.

**Mynd 6.13 Útlendingar sum prosent av starvsfólkatalinum í útvaldum vinnugreinum**




Kelda: Hagstova Føroyar

Aldurssamansetingin av útlendsku starvsfólkunum er øðrvísi samansett samanborið við føroysku starvsfólkini, sí mynd 6.14. 57% av føroysku starvfólkunum vóru millum 25 og 54 ár í 2024 samanborið við 81% av útlendsku starvsfólkunum. Kynsbýtið á føroysku starvsfólkunum var javnt býtt á 50/50 í 2024. Fyri útlendsku starvsfólkini var býtið 42% kvinnur og 58% menn.

**Mynd 6.14 Aldurssamansetingin av føroyskum og útlendskum starvsfólkum**




Viðm.: Hagtølini eru ikki tøk fyri 2024, tí talvan er endað, tølini eru frá 2023. 26.048 fólk hava danskan ríkisborgaraskap og 2.147 hava annan enn danskan ríkisborgaraskap.
Kelda: Hagstova Føroya

Í 2024 vóru 1000 uppihaldsloyvi avgreidd frá føroysku og donsku myndugleikunum, sum vóru latin sum upprunaloyvi við arbeiði fyri eygað. Upprunamál eru loyvið, ið eru givin til fólk, ið søkja um uppihaldsloyvi á fyrstan sinni. 56% av teimum loyvunum vóru givin eftir ES-skipanini og 44% eftir fast track skipanini fyri triðjalond.

Sambært Útlendingastovuni eru tey allar flestu upphaldsloyvini, ið vera givin á fyrsta sinni, til starvsfólk, ið hava arbeiði í vinnuni. Flest av teimum, sum koma úr Evropa koma úr eysturevropa og tað er serliga til byggivinnuna. Um hugt verður eftir kynsbýtinum á teimum, sum fáa uppihaldsloyvi á fyrstan sinni úr Evropa, so eru yvir 90% av teimum givin monnum, sum eisini samsvarar væl við kynsbýtið í byggivinnuni, har 91% av starvsfólkunum er menn.

Um hugt verður eftir somu loyvum, sum vera givin eftir fast-track skipanini fyri triðjalond, so vóru 75% av teimum givin monnum. Tað er torførari at siga, hvørja vinnugrein tey fara í, tí tey arbeiða í nógvum ymiskum vinnum t.d. ferðavinnuni, matstovum, flakavirkjum osv.

Tað hongur væl saman við at vinnan er vorðin meira domineruð av monnum, tá ið 85% av upprunaloyvunum vóru givin monnum.

# English summary: Economic Growth Slows Down

The Economic Council, in collaboration with Statistics Faroe Islands, has estimated GDP growth for the years 2024–2026. These GDP estimates are calculated in current prices. GDP growth is projected to be 3.0% in 2024, 5.0% in 2025, and 5.7% in 2026, as shown in the table below.

| | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP in current prices (billion DKK) | 25,2 | 26,9 | 27,7 | 29,1 | 30,8 |
| Annual growth in current prices (%) | 9,5 | 6,7 | 3,0 | 5,0 | 5,7 |
| Annual real growth (%) | 3,6 | 2,5 | | | |
| Inflation (%) | 7,7 | 4,7 | 2,0 | | |

**Note:** GDP figures for 2022 and 2023 are actual values from Statistics Faroe Islands, while figures for 2024, 2025, and 2026 are estimates from the Economic Council.
**Source:** Statistics Faroe Islands and the Economic Council.

Statistics Faroe Islands has compiled GDP figures up to 2023. In 2022, GDP grew by 9.5% in current prices, with real growth at 3.6%. In 2023, growth in current prices and real terms was 6.7% and 2.5%, respectively. The table also shows that inflation declined in 2024, meaning it no longer boosts GDP growth in current prices as significantly as it did in 2022 and 2023.

### Optimism Declines

Employment and wage payments reached record highs in 2024. The unemployment rate was only 1% in January 2025. This indicates that jobs are available for everyone, supporting private consumption. According to the latest consumer survey from Statistics Faroe Islands, slightly more households report that they just manage to make ends meet compared to the survey made in the summer 2024. However, prices are no longer rising at the same paste as they have recently and people have benefited from wage increases, tax cuts, and lower interest rates, which may improve household optimism. On the other hand, an increasingly uncertain world may make people more cautious. One possible sign of this caution is a decline in car sales and stagnant sales of durable household goods.

Unemployment has been low in the Faroe Islands for an extended period, which may limit the country's production capacity. However, mechanisms to attract foreign labor have helped ease labor shortages in certain industries and reduced pressure on wage growth. The introduction of the fast-track system for third-country nationals in November 2021 led

to a significant influx of foreign workers. The growth in foreign labor peaked in 2022 and has since declined, indicating that the surge in foreign employment is tapering off.

The construction industry indicator has fallen for the third consecutive half-year and, in the latest tendency survey, has dropped below the average level. The construction sector reports fewer orders and expects lower demand for labor in the coming year. According to the Faroese Association of Consulting Engineers and Architectural Firms consulting firms are also seeing a slowdown, suggesting fewer construction projects in the near future. In contrast, the retail sector is more optimistic. The latest economic tendency survey from Statistics Faroe Islands shows a significant improvement in retail expectations since the summer of 2024, including an upward trend in expected sales. The service sector is also optimistic, with recent positive trends and growing overall demand.

### Exports Decline, but Trade Surplus Increases

Total exports declined in 2024, but imports fell even more, resulting in an increased trade surplus. Overall, the outlook for export industries is positive. Resource-based industries report more orders and a more optimistic production outlook for the coming year compared to the last survey. The expected increase in resource-based production is likely driven by significant growth in aquaculture this year and next year. However, the fishing industry is expected to produce less next year due to declining quotas, including a reduction in the Barents Sea cod quota and a halving of the North Atlantic herring quota.

About half of Faroese exports went to the EU in 2024, while 10% went to the USA. Global financial markets have been unsettled by threats from the U.S. president to impose additional tariffs on imports from the EU and other regions. If economic growth in Europe slows down due to these tariffs, consumer purchasing power in Faroese export markets may decline, negatively affecting demand for Faroese fish products. Furthermore, if the U.S. imposes tariffs on European goods, it could also extend to Faroese products, particularly impacting salmon exports to the USA.

### Public Spending Continues to Grow

Public spending was higher in 2024 than in 2023, partly due to wage increases and salary adjustments for various professional groups. Additionally, the public workforce grew in 2024 compared to 2023. Public pension expenditures are also rising due to an increasing number of retirees. Municipal wage payments are growing as well. However, public investments declined in 2024 compared to 2023, and the government budget deficit is projected to be DKK 300 million in 2025 and DKK 265 million in 2026. This deficit amounts to about 1% of GDP each year, which is unsustainable in an economy with virtually no unemployment. A government budget deficit means that national debt will increase in the coming years, leading to higher interest expenses and requiring a larger portion of tax revenues to service the debt.

In January 2024, the Economic Council published a report on fiscal sustainability, showing that due to demographic changes, public expenditures will outpace revenues in

the future unless structural reforms are implemented. Therefore, controlling spending is essential. The Economic Council continues to recommend the implementation of a fiscal policy framework to ensure political decision-making aligns with clear fiscal goals for the next 5 to 10 years. Additionally, it is necessary to review revenue sources and introduce measures to increase them. The government must ensure that public revenues and expenditures are balanced over time, or public debt will continue to grow unsustainably.

### Structural Reforms Are Needed to Ensure Fiscal Sustainability

The government has proposed increasing the retirement age to 70 between 2035 and 2042. If adopted, this measure would improve fiscal sustainability. In several areas, operational structures can be reorganized to increase efficiency. The Faroe Islands have many small institutions in primary education, social services, and elderly care. Small institutions make efficient operations more challenging and require a higher number of staff per user compared to larger institutions, particularly when 24-hour staffing is necessary.

Elderly care and daycare services, which are large and resource-intensive sectors, are managed by municipalities. However, municipalities vary greatly in size, age demographics, and revenue base. The government must review the municipal structure, as not all municipalities will be able to meet future challenges. Reducing the number of municipalities would create stronger administrative capacity to handle daycare and elderly care services. Another option is to reassess whether daycare and/or elderly care should remain under municipal control. In any case, municipal funding must be reviewed.

The government should also establish a committee to develop concrete efficiency plans for the three major welfare sectors: social services, healthcare, and education. Unit costs must be reduced, or public expenditures will continue to rise indefinitely. Comprehensive reforms are needed across all welfare sectors.

### Investment Priorities

Public gross debt (EGS debt) is projected to be 30% of GDP by the end of 2025, amounting to DKK 8.8 billion. The recommended maximum general government gross debt (EMU debt) level is 60%, which would correspond to a debt of DKK 17.4 billion.

It is necessary and important to prioritize investments. If the purpose of investments is to improve fiscal sustainability, those investments that will ease the public operational burden in the long run must be given the highest priority. This can, for example, be achieved by constructing larger units within the school, public, and elderly care sectors.

To ensure sustainable societal development, there must be a balance between the present and the future, where investments benefit future generations without creating an excessive financial burden. Therefore, it is essential to prioritize correctly among social services such as nursing home accommodations, infrastructure, the education system, IT projects, and other initiatives.

The Faroe Islands should maximize the value of every Króna spent, which is why cost-benefit analyses should be conducted for major projects. This ensures that projects providing the greatest societal benefit are prioritized first.

# Keldur

ALS, ársfrágreiðing 2023
Avrik sp/f, Hvalvík
Betri Banki
Betri Heim
De Økonomiske Råd
ECB
Felagið Nótaskip
Fishpool.eu
Fíggjarmálaráðið
Føroya Banki
Gjaldstovan, Búskaparskipan Landsins (BSL) og landsroknskapurin
Hagstova Føroya
Havstovan
International Monetary Fund, IMF
Kommunufelag Føroya
Landsbanki Føroya
Samrøður við fyritøkur í fiskivinnuni
Samrøður við fyritøkur í alivinnuni
Vinnuhúsið
Visit Faroe Islands
Vørn

# Notur

[1] Útlendingar fáa ikki eftirlønina sum løn, KVF.fo 10.02.2025.

[2] Danski tjóðbankin nevnir sama trupulleika við føroyska brúkaraprístalinum í frágreiðingini frá 17. desember 2024; *Finanspolitisk planlægning kan øge robustheden i færøsk økonomi*, s. 8, Danmarks Nationalbank.

[3] Global growth: divergent and uncertain, World Economic Outlook Update, Januar 2025, imf.org.

[4] Our monetary policy statement at a glance, January 2025, ecb.europa.eu.

[5] Betri Banki hevur broytt fortreytirnar um afturgjaldstíð og eginfígging, so útrokningarnar betur umboða lánstreytirnar í dag. Tí kunnu myndirnar fyri roknaðu bústaðarbyrðuna hjá Betri Banka víst í eldri frágreiðingum hjá Búskaparráðnum ikki samanberast við myndina í hesi frágreiðing. Fyrrverandi fortreytirnar vóru, at støddin á láninum svaraði til 100% av miðal sethúsaprísinum í ávísa økinum (0% í eginfígging) og at lánið var eitt 25 ára annuitetslán. Hetta er nú broytt til, at eginfíggingin er 10% og lánið tí svarar til 90% av miðal sethúsaprísinum, og harafturat er lánið nú eitt 30 ára annuitetslán. Var roknað eftir gomlu fortreytunum, hevði bústaðarbyrðan í 2024 verið 52% í Tórshavn, 33% í Klaksvík og Føroyum samanlagt, og 28% í Eysturoy. Hagtølini fyri Klaksvík skulu takast við fyrivarni, tí tey kunnu sveiggja vegna fáar sølur.

[6] *Høje boligrenter og stigende boligpriser får boligbyrden til at stige*. Nordea, 17. januar 2024.

[7] Sí eisini útrokningar hjá Nationalbankanum av bústaðarbyrðuni við ymsum lánum (við ávikavist fastari ella broytiligari rentu og ávikavist við ella uttan avdráttir). *Store stød til økonomien har drevet boligpriserne,* s. 8 – 10, 25. september 2024, Danmarks Nationalbank.

[8] Hagtølini um bupláss eru frá 2015 – 2022, og stava frá talvuni AL02042 á hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya. Frá 2020-2022 hevur lutallið búfólki (fastbúgvandi og til umlætting) í aldrinum 80+ verið millum 22%-24% av samlaða fólkatalinum í aldursbólkinum. Verður í staðin bert hugt at fastbúgvandi, hava tað verið millum 18%-20% av teimum sum eru 80+, ið eru fastbúgvandi á ellis- og røktarheimi.

[9]Tað almenna meinast við almenna fyrisiting og tænastu. Almennar fyritøkur, sum hava marknaðarligt virksemi vera flokkaðar undir vinnuna. Her er talan um td. Rúsuna, Apotekið og almenn partafeløg s.s. Føroyar Tele og Vága Floghavn. T.v.s. vinnan inniber feløg, húsarhald og felagsskapir undir bæði privatum og almennum ræði.

[10] Arbejderbevægelsens erhvervsråd 2025, *Offentlige arbejdstimer per borger er faldet til indeks 95*.